

BYGGISKRÁ. November 2018

# TJÓÐLEIKHÚS

- til virksemið hjá Tjóðpalli Føroya

LANDSVERK

# INNIHALD


**1.0. Ein Tjóðpallur – hugleiðing og visjón** 4
**2.0. Inngangur** 6
2.1. Verkevni 6
2.2. Byggiánari og byggiharri 7
2.3. Brúkarar 8
2.4. Virksemi og bygnaður 8
**3.0. Skipan av byggimáli** 12
3.1. Skipan undir skriving av byggiskrá 12
3.2. Arkitektakapping - Hugskotskapping 12
3.3. Skipan undir restini av verkætlanini 13
**4.0. Fortreytir** 14
4.1. Lógargrundarlag 14
4.2. Byggiøkið 14
4.3. Søgan um økið 15
4.4. Atkomuvegir 15
4.5. Veðurlag 15
4.6. Veitingar 15
4.7. Lendisviðurskifti 16
4.8. Myndugleikakrøv 16
**5.0. Krøv og ynski til byggimálið** 17
5.1. Aðalmál við byggilistini 17
5.2. Staðseting 18
5.3. Burðardygd 18
5.4. Ljóðviðurskifti 19
5.5. Inniumhvørvið 19
5.6. Fólk við breki 19
5.7. Virkisøkini í Tjóðleikhúsinum 19
5.7.1. Pallar 20
5.7.2. Verkstøð 21
5.7.3. Goymslur 23
5.7.4. Tøknirúm til virksemið 24
5.7.5. Tøknirúm til húsið 25
5.7.6. Starvsfólkarúm 25
5.7.7. Almenn rúm 26
5.7.8. Samlað rúmyvirlit 27
**6.0. Skipan av byggiøkinum** 28
6.1. Lendið 28
6.2. Økið uttanum 28
6.3. Atkomuvegir 28
6.4. Parkering 28
6.5. Skipan av bygningunum 29

**7.0. Tøkni og veitingar** 30
7.1. Veitingar (til bygningin) 30
7.2. Innleggingar (í bygninginum) 30
7.3. Luftskifti 32
7.4. Ljós 32
7.5. Palltøkni 32
7.6. Ljóð, video og samskifti 33
7.7. Tele og net 33
7.8. Dempararúm 33
**8.0. Krøv og ynski til bygningslutir** 34
8.1. Framsíður 34
8.2. Skilaveggir 34
8.3. Gólv 35
8.4. Loft 35
8.5. Útgerð 35
**9.0. Krøv og ynski til list, innbúgv og útbúnað** 36
9.1. Listprýði 36
9.2. Innbúgv og útbúnaður 36
**10.0. Fíggjarlig viðurskifti** 37
10.1. Stigbýti og raðfestingar 37
**11.0. Tíðarætlan** 38
**12.0. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)** 39
12.1. Heilsa trygd og umhvørvi 39
**13.0. Rakstur & Viðlíkahald (R&V)** 40
13.1. Prosjektering (R&V) 40
13.2. Gransking (R&V) 41
13.3. Avhendan (R&V) 41
13.4. Gransking og góðskutrygging 42
**14.0. Fylgiskjøl** 44

# 1.0. Ein Tjóðpallur – hugleiðing og visjón

Á parkeringsøkinum framman fyri bergið á *Skálatrøð* skal Tjóðpallur Føroya byggjast. Ein bygningur til hugaheim okkara, hvørs aðaltanki er at bergtaka og hugtaka. Tí eiga vit at leggja okkum eftir, at hetta verður eitt *stað, sum letur seg upp, og sum vit ikki kenna okkum fremmand í.*

Tað, eg síggi og hoyri fyri mær, tá hugtakið *bergtikin* verður nevnt, eru aldargamlar søgur, sagnir, kvæði og ævintýr úr okkara frásøgu- og hugaheimsmentan. Um forfedrar, ið búðu undir trongum lonum og ferðaðust úti í okkara náttúru, undir bjørgum og korkalittum royðufláum, á grønum vøllum, í djúpum dølum, eftir varðum og líðum. Har teir møttu teimum fornisku verunum, teimum yvirnatúrligu og heidnu, ið búðu í heyggjum og *í hellum, gjáum, látrum og drangum úr basalti, súlugróti og royðu. Her* var *teirra* huldi hulduheimur. Her búðu dvørgar, vættrar, risar og kellingar. Huldufólk, ið "bergtóku" hin einsamalla vallaran, sum stundum hvarv og ongantíð sást aftur. Ella Mikladalsdreingin, ið sá kóparnar við sólsetur leggja hamin á helluna og dansa, til sólin aftur reis úr havi. Eisini unglingurin varð *bergtikin,* og við mannasnildum fjaldi hann hamin og vann sær Kópakonuna, sum hann var vorðin *hugtikin* av. Hann var *BERGTIKIN* eins og søgur, sagnir og kvæði heilt frá dreingjaárum *HUGTÓKU* meg, so eg *varð bergtikin av einum heimi, sum eg kendi meg heima í.* Ella í minsta lagi ikki var mær fremmandur.

Í dag fevna *hugtikin og bergtikin* nærum um tað sama. Tú verður tikin av fótum og fluttur inn í ein annan heim. Ein sálarligan heim. Tín *hugaheim á Skálatrøð - LEIKHÚSIÐ.*

Smá- og útróðrarbátabryggjan við vestara havnarøki fyri sunnan. Í norðurendanum berg við grønari grasfløtu. Sum ein hestaskógvur eystan-, vestan- og norðanfyri fevnir høvuðsstaðurin Tórshavn um allan Tjóðpallin. Mitt í Føroyum. Við 50.000 íbúgvum. Fyri sunnan Nólsoyggin og opið hav, Atlantshavið. Hav, strond, fløta, berg, hamari og líðin grøna. Eitt umhvørvi líkt tí, har tey fornisku á sinni ráddu. Á hesum staði skal byggjast ein Mentanar-Tidna! Skapt úr eldgosi, súlum, gjáum og bergi, royðugróti og grønum líðum. Har skal tidnan skapast. Hon hvørs endamál er at *bergtaka* okkum. Fevnd av aldargamla býnum, høvuðsstaði okkara, Havnini. Himin og hav. Hetta er umhvørvið, har Føroya fyrsta leikhús skal liggja. Kanska tað fyrsta av sínum slag í so lítlum etniskum umhvørvi yvirhøvur. Her skal Leikhúsið - Teatrið - standa, hvørs upphav á sinni varð bygt við fótin á Akropolis í Athen fyri uml. 3000 árum síðani – og liggur har enn tann dag í dag. Hvørs aðalmál, tá og til allar tíðir, er at minna og vísa okkum á, hvaðani vit komu, hvørji vit eru, og hvagar leiðin gongur.

Í føroyskari mentan, úr hugaheiminum, sum er skaptur av gerandislívi okkara, liggur alt mannaskapt lív, fjalt í mýtum, kvæðum, dansi og sagnum. Tryggjað og fjalt undir heilt. Varðveitt í frásøgn, um tey fornisku, hvørs bústaður er í bø, hellu og fram við sjóvarstrond. Í vísind, list og mentan finna vit aftur sambandið og halda áfram. Nú hava vit í 2016 gjørt av, her á klettunum, at byggja okkara fyrsta teatur burturav.

Her skal hugaheimur okkara húsast og eiga "høgt til loft og vítt til veggja", sum tikið verður til. Tú skalt kenna teg væl og vælkomnan. Við góðari samvitsku kenna teg frían í nakrar tímar av dagsins strevi og ampa. Hetta er ikki ein kirkja, ikki eitt samkomuhús til fólksligar fundir, veitslur, ei heldur andalig møti ella eitt konserthús. Eitt leikhús er til leiklist, ið rúmar øllum listagreinum, henni tørvar. Drama, dansi, sangi og tónleiki. Myndlist og skaldskapi. Men fyrst og fremst: ein mentanartidna ætlað teimum vitjandi: áskoðarunum og útinnandi sjónleikarunum!

AT ENDA: EIN VISJÓN!
Tá eg síggi Tjóðpallin á Skálatrøð - TIDNUNA - skal eg kenna meg drignan at nøkrum, ið ikki er snórabeint, loddrætt og fýrakantað, men ber dám av onkrum duldarfullum, skeivum og á skák, ið talar til mítt forvitni.

Eins og eg á sinni á útferðum undir bjørgum varð vaggaður innanborða, leiddur millum drangar og flúrar inn í gjáir og helli við komandi og farandi ljósgeislingum úr sprungum og niður úr helluloftinum. BERGTIKIN!

Eyðun Johannessen, várið 2016

# 2.0. Inngangur

Byggiskráin er eitt av teimum týdningarmiklastu skjølunum í eini byggiverkætlan, av tí at hon lýsir ynski og krøv hjá byggiharranum og brúkaranum til tann lidna bygningin.

Tann lidna byggiskráin skal nýtast sum grundarlag fyri einari arkitektakapping um endaligu byggiloysnina. Arkitektakappingin ætlast at verða á heysti í 2019, so støða kann takast til endaliga uppskotið á vetri í 2019. Væntandi verður klárt at byrja arbeiðið at projektera og byggja Tjóðleikhúsið á vetri/vári í 2020, treytað av, at aðrar fortreytir eru loknar, eitt nú at fígging og byggilendi eru tøk.

Bygginevndin ímyndar sær, at bygt verður eitt Tjóðleikhús á uml. 4.000 $m^2$, íroknað parkeringsumstøður, uttanumøki og tøkni til bygningin annars. Tjóðleikhúsið skal húsa øllum teimum hentleikum og krøvum til fleksibilitet og dygd, ið væntast kunnu av einum nútímans leikhúsi bæði til leikframleiðslu, leikara- og áskoðaraumstøður og umsiting v.m., soleiðis sum tað eisini sæst í hesi byggiskrá.

## 2.1. Verkevni

Um Tjóðpallur Føroya skal kunna menna yrkisleiklistina og harvið verða við til at styrkja um áhugaleiklistina, er neyðugt, at arbeiðsumstøðurnar eru so, at livast kann upp til tey krøv, ið løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. ásetur.

Verandi umstøður hjá Tjóðpalli Føroya gera tað sera torført, fyri ikki at siga púra ómøguligt, at røkka endamálinum við lógini. Her verður serliga hugsað um hølisviðurskiftini.

Bygginevnd at stíla fyri bygging av nýggja Tjóðleikhúsinum var sett 3. septembur 2013, har høvuðsuppgávan hjá bygginevndini var soljóðandi:

1. Finna fram til bestu loysnina, so Tjóðpallur Føroya kann flyta inn í nýggj høli. Kannast skal eisini, um byggingin eigur at fara fram í stigum.
2. Vegna Mentamálaráðið hava eftirlit við, at valda loysnin verður framd í verki.
3. Leggja dent á eina loysn, sum sameinir góðar arbeiðsumstøður, frálíkan sýningarpall og eitt glæsiligt býarmerki fyri høvuðsstaðin.

Við støði í tí vitan, ið er í bygginevndini, byrjaði arbeiðið at tilevna byggiskránna beinanvegin. Til at veita arbeiðinum kvalifiseraðan íblástur í mun til líknandi leikhúsloysnir, var bygginevndin á eini kunningarferð í Íslandi í november 2013.

Talan skal vera um eitt livandi hús, har sjónleikarin ella "tann, ið førir fram", er í fokus og gevur føroyingum upplivingar á høgum listarligum støði hvønn dag.

## 2.2. Byggiánari og byggiharri

**Byggiánari:**

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
FO-110 Tórshavn
mmr@mmr.fo

**Byggiharri/ráðgevi:**

Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

**Bygginevnd:**

Bjarni Wilhelm, Formaður
Mentamálaráðið
bjarniwilhelm@outlook.com

Alda Joensen
Mentamálaráðið – Fulltrúi og skrivari
aldaj@mmr.fo

Jenny C. Petersen
Tjóðpallur Føroya - Stjóri
jenny@tjodpallur.fo

Jóan Petur Hentze
Tórshavnar Kommuna - Trivnaðarstjóri
joanpetur@torshavn.fo

Birita Wardum
Tórshavnar kommuna - Býararkitektur
biritaw@torshavn.fo

Ingibjørg Berg
Leiklistaráðið – frá 1. des. 2017
ingibjorg@commit.fo

Elsa Johanna Høgenni
Leiklistaráðið – fram til 30. nov. 2017
elsah@torshavn.fo

Árni Baldvinsson
Tjóðpallur Føroya, Ljóstøkningur – Andaðist 7. august 2018
arni.bald@mac.com

Yvirskipaða uppgávan hjá bygginevndini er at tryggja, at Tjóðpallur Føroya, starvsfólkini og brúkarar av Tjóðpallinum fáa virðiligar karmar at nýta og virka undir og at mæla til loysnir í byggimálinum, sum eru í samsvari við hetta og ásettu yvirskipaðu karmarnar.

Arbeiðssetningurin hjá bygginevndini, sbrt. tilnevningarskrivinum "*Tilnevning í bygginevnd at stíla fyri bygging av tjóðleikhúsi á Skálatrøð*", *er, at*:

- Saman við Landsverki taka lut í fyrireikandi arbeiðinum, harundir
  - Seta upp tørv, krøv og ynski til ætlaða tjóðleikhúsið,
  - Gera byggiskrá, ið skal vera grundarlag fyri gerð av skipanaruppskoti.
- Hava eftirlit við, at skipanaruppskot og projekt eru í samsvari við byggiskránna.
- Tryggja fakligu góðskuna við atliti at funktionaliteti, og um neyðugt fyriskipa hoyringar av brúkarabólkum.
- Vera bindilið millum Mentamálaráðið og Landsverk, harundir virka sum fakligur ráðgevi við atliti at funktionaliteti.
- Gera tilmæli til Mentamálaráðið, so hvørt sum tær einstøku fasurnar í byggitilgongdini eru loknar.
- Kunna Mentamálaráðið, so hvørt sum arbeiðið líður.

## 2.3. Brúkarar

Hoyringaruppskotið varð sent til ymiskar brúkarabólkar at viðmerkja og harvið vera við til at upplýsa, hvør framtíðar tørvurin verður. Samstundis sum at brúkarasamskiftið tryggjar nøgdsemið hjá brúkarunum, eru brúkarabólkarnir við til at tryggja, at Tjóðpallur Føroya fær best møguligu framtíðarkarmarnar. Brúkarabólkarnir skulu serliga virka innan viðkomandi arbeiðsøki.

Brúkarabólkarnir, sum fingu hoyringaruppskotið, vóru:

- **Bólkur 1:** sjónleikarar/dansarar/tónleikarar/leikstjórar/pallsniðgevar
- **Bólkur 2:** búnaskraddarar, rekvisitmakarar, hár og sminka
- **Bólkur 3:** ljóð- og ljóssniðgevar, timburverkstaður, sveisiverkstaður, málararverkstaður og tøkningar (ljós-, ljóð- og pallfólk)
- **Bólkur 4:** Leiklistaráðið og umsitingin á Tjóðpalli Føroya

Fundir hava verið í ymisku brúkarabólkunum, og bygginevndin hevur fingið nógvar góðar viðmerkingar til, hvussu virksemið verður lýst betri, umframt upplýsingar um, hvat ymisku bólkarnir halda manglar í byggiskránni. Viðmerkingarnar eru skrivaðar inn í hesa byggiskránna.

## 2.4. Virksemi og bygnaður

**Forsøgan til Tjóðpall Føroya**

Fyrstu ferð, vit finna nakað skrivað um sjónleik í Føroyum, er í "Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782" eftir J.C. Svaboe: um "Lege og Lystigheder", har tað millum annað verður skrivað: "*På fornemme Bryllupper og Lystigheder, især i Thorshavn, begynder den færøske dans meget at gaae af brug, og i dens sted at indføre Menuets, polske, engelske, skotske Reels- og Contra-Danser. Paa Thorshavn giver man i de sildigere Aar ei saa sjelden smaa Baller, ja for kort siden have de unge, som havde været i Kjøbenhavn, spillet 2 komedier, nemlig Studenstrup og Herman von Bremenfeldt. Aktion, Musik, Decoration og andre Anstalter, skulle efter det Steds beste Skjønnere have langt overgaaet Formodning".*

Eftir hetta var javnan spæld "Komedia" í Tórshavn. Líkt er til, at tað mest hava verið embætisfólk og fólk av tí sokallaða "betra slagnum", sum spældu, og tað var altíð á donskum.

Um føstulávint 1889 verða teir fyrstu føroysku sjónleikirnir "Veðurføst" eftir Sonnu Helenu Patursson og "Gunnar Havreki" eftir Rasmus Effersøe spældir.
Eftir hetta er tað eitt sindur skiftandi danskir og føroyskir leikir, ið verða spældir, og við tí vaksandi sjálvstýrisrákinum verður so við og við alt spælt á føroyskum. Viðhvørt føroyskir nationalromantiskir leikir ella týddir leikir.

Í 1923 verður fyrsti pallur bygdur í Skopun. Og í 1926 bleiv Sjónleikarhúsið í Havn liðugt. Í Varðanum 11 frá 1931 skrivar William Heinesen: "*Var tað ovkravt, at samfelagið á einhvønn hátt studdi uppundir til at útvega teimum fólkum, ið strevast fyri at skapa ein sámuligan tjóðskapligan leikpall, betri arbeiðskor? Ber ikki til onkursvegna at fáa leikhúsinum vissari inntøkur, um ikki beinleiðis við styrki frá løgtingi ella býráð, so á annan hátt, t.d. við loyvingum ella lunnindum av einhvørjum slag? Ið hvussu er, er tað skomm, at leikhúsið, sum gjørt var við menningarligari fyriætlan, verður sett ájavnt við eina hvørja menningarleysa dansistovu – hvør, ið so skommina eigur."* Eftirfylgjandi árini er stórt virksemi innan áhugaleik í Føroyum.

Fyrsti yrkisleikstjóri er í Føroyum og leikstjórnar í 1954, og førir hetta við sær, at Eyðun Johannessen fer undir útbúgving til sjónleikara, og í 1960 kemur hann heimaftur og byrjar sum leikstjóri hjá Havnar Sjónleikarafelag og hevur skeiðsvirksemi har. Í 1973 bleiv fyrstu ferð játtaður peningur til leiklist á fíggjarlógini, kr. 70.000,-. Í august í 1977 byrjaði Gríma, fyrsti yrkisleikbólkur í Føroyum. Hetta hevði við sær, at fleiri fóru at taka listarligar og tøkniligar útbúgvingar innan leiklistaøkið. Leikpallur Føroya var settur á stovn 12. mars 1989, og ætlanin var, at hetta skuldi verða byrjanin til Tjóðpall Føroya, men tá kreppan kom, tódnaði ynskið um Tjóðpall til umsiting av tí fígging, ið var til leiklist frá landinum.

**Um Tjóðpall Føroya**
Tjóðpallur Føroya er settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Tjóðpallur Føroya avloysti Leikpall Føroya, sum var skipaður í 1989. Yrkisleiklistin í Føroyum hevði fram til stovnsetanina av Leikpallinum virkað burturav í og kring Leikbólkin Grímu, sum byrjaði sítt virksemi í 1977. Tjóðpallurin fór at virka 1. februar 2005. Eftir hetta hevur verið eitt javnt virksemi í mun til lógarásettu krøvini við tí avmarkan, ið játtanin gevur. Longu frá stovnanini av Tjóðpalli Føroya var semja um at fyri at fylgja lógini og lúka tey krøv, ið eru til leiklist á høgum støði, var neyðugt at fáa nýtt Tjóðleikhús til vega.

Tjóðpallurin hevur framført bæði barna- og familjuleikir, klassiskar og nýskrivaðar leikir. Stórur dentur hevur verið lagdur á at menna føroysk leikrit, umframt tónleikaverk, so sum fyrstu føroysku operuna. Tjóðpallurin hevur havt eina listarliga menning seinastu árini, men um hon skal halda fram, er neyðugt við nýggjum kørmum, ið liva upp til nútíðarkrøv. Tjóðpallur Føroya skal eisini byggja brýr millum ymisku listagreinirnar so sum tónleik, myndlist, dans og skaldskap. Hetta er gjørt við m.a. samstarvi við Aldubáruna, Musikkskúlan, Norðurlandahúsið umframt onnur listafólk úr ymiskum listagreinum. Eisini er eitt ávíst samstarv við áhugaleiklistina.

Avgerðin um at seta Tjóðpall Føroya á stovn var eitt týðandi stig á leiðini at menna leiklistina. Fyri at røkka á mál mugu nakrar neyðugar íløgur gerast, so at samsvar verður millum politisku visjónirnar og listarliga veruleikan. Tjóðpallurin virkar undir leiðslu av stjóra, sum hevur ábyrgd av øllum virkseminum. Afturat stjóranum eru fleiri fríyrkisstarvsfólk knýtt at Tjóðpallinum.

**Arbeiðsgongdir:**
Tá ið áskoðarin sær eina leik, er eitt stórt arbeiði gjørt, innan sýningin kann byrja. Diagrammið niðanfyri lýsir í stuttum verandi arbeiðsgongd á Tjóðpalli Føroya:




Á diagramminum sæst, at verandi dagliga framleiðsluvirksemið er skipað bæði um dagin og um náttina, hetta grundað á plásstrot, sum ger, at ymisku toymini ikki kunnu arbeiða samstundis. Eisini eigur at verða nevnt, at oftani er neyðugt at arbeiða í vikuskiftum og heiligdagar.

Í nýggja Tjóðleikhúsinum eigur dentur at leggjast á, at arbeiðsumstøðurnar verða raðfestar, so at framleiðsluarbeiðið kann skipast í dagtímunum. Ein stórur partur av arbeiðinum at seta ein leik upp gongur fyri seg handan leiktjøldini, og tískil skulu umstøðurnar eisini vera nøktandi til henda partin av virkseminum.

Umframt dagliga virksemið og umsiting á Tjóðpallinum kann virksemið býtast í fyrireikingar-, framleiðslu- og sýningarskeið.

Tað, ið miðast skal ímóti, er, at toymini undir eini framleiðslu hava møguleika fyri at samstarva um at røkka sama listarliga endamáli og í felag menna sýningina.

Vanliga verður virksemið í einum leikhúsi skipað soleiðis, at áðrenn fyrstu venjingarnar hittast leikstjóri, pallsniðgevi og tøkniligi hópurin 1 til 3 ferðir, har leikstjórin og pallsniðgevin koma við sínum ætlanum. Tøknifólkini siga, hvørjar møguleikar og hvørjar avbjóðingar teirra ætlanir hava við sær.

Tá farið verður undir venjingar, verður byrjað við, at øll, ið eru knýtt at verkætlanini, eru saman í nakrar dagar, har leikritið verður lisið, og sagt verður frá ætlanunum. Model og tekningar av palli og búnum

verða víst, tosað verður um tónleik, ljóð og ljós o.s.fr. Eftir hetta er vanligt, at hvørt toymið sær fer til verka og hevur vanligar arbeiðstíðir. Hvørja viku eru framleiðslufundir, har toymini samskipa arbeiðið.

Framleiðsluskeiðið er vanliga millum 6 og 8 vikur, og sýningarskeiðið er vanliga í uml. 3 vikur.

Tjóðpallur Føroya velur leikir við atliti at lógini fyri Tjóðpall Føroya.

**Starvsfólk og fígging**

Tjóðpallurin fær stuðul til sítt virksemi yvir fíggjarlóg landsins. Tá stovnurin byrjaði sítt virksemi í 2005, var játtanin 2,4 mió.kr. árliga, og í dag er hon 4,8 mió.kr. árliga, umframt eina egininntøku á kr. 848 tús. kr.

Av tí, at eingin lønarsáttmáli var fyri leikhússtarvsfólk, varð ein avtala gjørd millum Leikarafelag Føroya og Tjóðpall Føroya. Hetta hevði við sær stóra hækkan í lønarútreiðslunum, ið tó ikki førdi við sær, at játtanin hækkaði samsvarandi. Á stovninum er 1,5 fastsett fólk (stjórin og skrivstovufólk), restin eru fríyrkisfólk, ið verða sett til ávísar uppgávur. Av hesum verða nøkur goldin um lønarskipanina, meðan onnur gera arbeiðið upp á rokning. Virkað verður fyri at fáa fastsett fólk innan øll yrkisøkini.

# 3.0. Skipan av byggimáli

## 3.1. Skipan undir skriving av byggiskrá

Arbeiðið at skriva byggiskránna hevur verið skipað soleiðis:




## 3.2. Arkitektakapping - Hugskotskapping

Tjóðleikhúsið verður boðið út í arkitektakapping, og verður kappingin skipað á henda hátt:




## 3.3. Skipan undir restini av verkætlanini



# 4.0. Fortreytir

## 4.1. Lógargrundarlag

Henda byggiskrá verður nýtt sum grundarlag fyri verklagslóg.

## 4.2. Byggiøkið

| Virkið: | Addressa: | Matr. nr.: | Eigari av matr.: | Vídd á matr.: (markerað við bláum) | Vídd á parkeringsøkið: (innrammað økið) | Tillutað økið: |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Parkeringsøkið | Skálatrøð | 201 | Tórshavnar kommuna | 15388 m² | 6500 m² | - |



Tórshavnar kommuna eigur matrikul 201, partvíst nevndur Skálatrøð. Skálatrøð er eitt alment øki, sum liggur sera væl fyri mitt í høvuðsstaðnum. Skálatrøð er eisini ein partur av havnafrontinum í Tórshavn.

Stórur áhugi hevur verið millum manna at sleppa at gagnnýta Skálatrøð á annan hátt enn í dag, har so at siga alt økið verður nýtt til alment parkeringspláss.

Býráðið samtykti á fundi 30. oktober 2014, at Tjóðleikhús verður staðsett á Skálatrøð.
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur síðani, saman við Zeta-arkitektum og í samstarvi við bygginevndina fyri Tjóðleikhús, gjørt rúm- og støddarkanningar í sambandi við staðseting av Tjóðleikhúsinum á Skálatrøð.

Kanningarnar fevndu um ymiskar loysnir við skipan av Skálatrøð til staðseting av parkeringshúsi, byggiøki til framtíðar kommunala mentanarfunktión á uml. 3000 $m^2$ og byggiøki til Tjóðleikhús á uml. 3000 $m^2$. Víst verður til "Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini".

Við støði í bygningskunngerðini frá 2017 krevur bygningur av hesi stødd 139 parkeringspláss.

## 4.3. Søgan um økið

Skálatrøð var upprunaliga fjørulendi. Fyrst í 1800 talinum vóru onkrar traðir lagdar inn í Havnina, har ímillum Skálatrøð. Skálatrøð var trøð fram til 1825. So við og við var lendið sprongt burtur, so betri vinnumøguleikar fyri sjóvinnuna kundu vera á Vestaruvág. Men økið var í 1978 væl planerað og síðani strikað upp til parkeringspláss, og hevur tað virkað sum parkeringspláss síðani.

Í 1982 var bátahavnin undir Skálatrøð gjørd liðug, og hevur bátahavnin síðani tá verið víðkað til enn fleiri bátapláss.

Áhugin fyri at byggja ymiskt á Skálatrøð hevur verið sera stórur gjøgnum tíðirnar. Nevnast kann, at ynski hevur verið at byggja sjómansheim, hotell, ellisheim, eldraíbúðir, almennar íbúðir, skrivstovur, ymiskt vinnuligt virksemi umframt nógv annað á økinum.

Trupult hevur verið at taka støðu til, hvat skal staðsetast á Skálatrøð, men hevur Býráðið nú tikið støðu til, at Skálatrøð skal nýtast til mentanarligt virksemi saman við parkeringsmøguleikum fyri býin og virksemið.

## 4.4. Atkomuvegir

Av tí at staðsetingin er miðskeiðis í býnum, eru atkomumøguleikarnir góðir, bæði við akfari og til gongu. Busssambandið er eisini avbera gott oman í miðbýin, og er tað ikki langur teinur at ganga frá Steinatúni oman á Skálatrøð. Víst verður til "Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini", sum lýsir verandi og møguliga komandi atkomuviðurskifti til økið.

Uppskot til parkingeringsloysn er at gera eitt parkeringshús, soleiðis, at tá økið verður tikið til bygging, verða nøktandi parkeringsviðurskifti til bygningarnar. Virksemið í Tjóðleikhúsinum krevur mest parkering um kvøldarnar, meðan største nýtslan av parkeringshúsinum annars verður, sum í dag, í dagtímunum. Víst verður til "Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini", sum eisini lýsir ætlanirnar hjá Tórshavnar kommunu at gera parkeringshús inn ímóti berginum.

## 4.5. Veðurlag

Økið er miðskeiðis í miðbýnum í Tórshavn og liggur ikki ábart fyri í mun til veður og vind.

## 4.6. Veitingar

Víst verður til [www.kortal.fo](www.kortal.fo), har verandi tøkniligu veitingarnar, vatn, kloakk og frárensl í økinum kunnu síggjast.

## 4.7. Lendisviðurskifti

Upprunaliga var lendið fjøra og bøur. Uppruna lendið var sprongt burtur, og økið var planerað og asfalterað. Nakað av lendinum er á fastari jørð, meðan nakað av lendinum út ímóti bátabrúgvunum er fylt upp.

Víst verður til "Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini", sum lýsir ætlanirnar um at byggja eitt parkeringshús niðri á Skálatrøð, og sum kemur at verða tongt at Tjóðleikhúsinum.

## 4.8. Myndugleikakrøv

Byggingin skal fylgja Almennu byggisamtyktini, umframt serstøku byggisamtyktini fyri økið.

Byggingin skal harafturat fylgja føroysku bygningskunngerðini. Harumframt skulu faknormar og vegleiðingar fyri ávísu byggingina fylgjast. Krøv um parkering eru eisini fevnd av bygningskunngerðini.

Krøvini frá Arbeiðseftirlitinum um arbeiðsumhvørvi skulu somuleiðis fylgjast. Serlig krøv eru til høli, har fólk starvast, undir hesum krøv til verkstaðirnar við dálkandi evnum, trygdina á ljósbrúgvunum yvir pallunum o.s.fr.

Uttanhýsis ráðgevin avgreiðir byggiloyvi við Tórshavnar kommunu.

# 5.0. Krøv og ynski til byggimálið

## 5.1. Aðalmál við byggilistini

Aðalmálini fyri nýggja Tjóðleikhúsið eru, at Tjóðleikhúsið skal:
- vera savningarstað fyri leiklist úti og heima
- seta brúkaran í fokus (bæði sjónleikaran/framføraran og áskoðaran)
- vera býarmerki fyri høvuðsstaðin og Føroyar
- stuðla undir tvørfakligt samstarv

Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul v.m. ásetur í §5, at Tjóðpallur Føroya skal:
1. í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði, eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk
2. geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist - sjónleiki so væl sum aðrari palllist
3. tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra
4. skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum
5. fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

Nýggja Tjóðleikhúsið, sum verður karmur um Tjóðpall Føroya, skal sostatt gerast við endamálinum at tryggja, at neyðugu karmarnir eru fyri at náa bæði aðalmálunum og ásetingunum í løgtingslógini. Men fyri at røkka aðalmálunum og ásetingunum í løgtingslógini hevur bygginevndin valt at seta nøkur ítøkilig virði á skrá, sum eru sera týdningarmikil at røkka, so at Tjóðpallur Føroya hevur nøktandi karmar at virka í:

- Tjóðleikhúsið skal veita **<u>leiklist á hægsta stigi</u>**, sum krevur, at karmarnir kring pallarnar eru nøktandi. Hetta merkir, at dentur skal leggjast á at geva rúm fyri neyðugum pallum, goymslum og tøkni kring pallarnar, nøktandi pláss fyri áskoðarum o.s.fr., og at sambandið millum pallar og onnur arbeiðsrúm er staðsett rætt.

- Tjóðleikhúsið skal hava **<u>hóskandi arbeiðsumstøður</u>** hjá leikhússtarvsfólkunum – Ynski er, at Tjóðleikhúsið í sær sjálvum gevur karmarnar rundan um eitt vælvirkandi arbeiðspláss. Hetta krevur, at starvsfólkini hava nøktandi rúm til venjingar, verkstøð, goymslur, tilhald, hvílihøli, skiftingarrúm o.s.fr., men eisini, at virkini verða staðsett rætt í mun til ávísa virkið.

- Tjóðleikhúsið skal hava ein **<u>serligan týdning fyri samfelagið</u>** við at vera innbjóðandi, draga fólk at sær, vera eitt savningarstað í býnum og við at menna tvørfakligt samstarv.

- Tjóðleikhúsið skal vera ein **<u>byggilistarlig tirna</u>** við, at skap og snið tekur støði í ymisku virkjunum, sambandinum teirra millum, sundurbýtinum millum opið og lokað, umhvørvinum uttanum, parkering, forplássinum, foyer o.s.fr. Harumframt er tað av týdningi, at skap og snið er nýskapandi, bjóðar teimum vitjandi eina uppliving, at val av tilfari er samanhangandi í litum og við høgari góðsku í mun til haldbæri og ellidæmi. Ynskið er somuleiðis, at fólk streyma til fyri at uppliva leiklistina, men eisini fyri at skoða byggilistina.

- Tjóðleikhúsið skal sum heild **<u>virða list,</u>** og er ynskið, at list verður eitt gjøgnumgangandi tema í bygninginum. Listin kann vera við til at vísa veg og á tann hátt gera bygningin lætt atkomiligan. Listin kann eisini vera við til at geva einum øki ella fleiri samanhangandi økjum ein ávísan dám.

- Tjóðleikhúsið skal í størst møguligan mun verða **umhvørvisvinarligt**, tá hugsað verður um byggitøkniligu góðskuna í mun til val av tilfari, eginleikarnar í bygningslutunum og orkuveiting.

## 5.2. Staðseting

Arbeiðsbólkurin, sum í 2008 var settur at greina hølistørv Tjóðpallsins og at gera uppskot um varandi loysn til Tjóðleikhús føroyinga, hevur alla tíðina havt sum týðandi fortreyt, at staðsetingin av nýggja Tjóðleikhúsinum er í høvuðsstaðnum. Hetta er eisini í samsvari við tær ætlanir, ið vóru grundarlagið undir stovnanini av Tjóðpalli Føroya.

Í bygginevndartilnevningarskjalinum var nevnt, at Tjóðleikhúsið skuldi byggjast á Skálatrøð, men skjótt gjørdist greitt í samskiftinum við Tórshavnar kommunu, at kommunan metti, at Tjóðleikhúsið eins væl kundi byggjast á økinum, har Kommunuskúlin stendur tómur. Spurningurin um staðsetingina hevur síðani verið frammi nakrar ferðir millum kommununa, Mentamálaráðið og bygginevndina.

Á vári í 2015 boðaði kommunan frá endaligari støðutakan um, at staðsetingin av Tjóðleikhúsinum skuldi verða soleiðis, sum upprunaliga ætlað, á Skálatrøð. Kommunan hevur nú skipað Skálatrøð sum mentanarøki burturav, og har tað, umframt Tjóðleikhúsi, eisini er pláss fyri øðrum mentanarbygningi og parkeringshúsi. Víst verður til "Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini", sum lýsir, hvussu Tórshavnar kommuna fer at skipa økið, bæði í mun til staðseting av ymisku virksemunum, og hvussu ferðslan er ætlað at verða skipað.

Eftir er hjá kommununi at broyta byggisamtyktina fyri Skálatrøð, so heimild verður at byggja Tjóðleikhúsið har. Eisini er eftir hjá kommununi at boða Mentamálaráðnum útgreinað frá, undir hvørjum treytum byggilendið verður latið. Hesum arbeiðir Tórshavnar kommuna við.

Tjóðleikhúsinum tørvar eitt byggilendi á umleið 3500 $m^2$, umframt økið uttanum.

Upprunaliga ynski um staðseting er sostatt gingið á møti, við at Tjóðleikhúsið verður staðsett á Skálatrøð.

Bygginevndin metir, at hetta er ein góð staðseting fyri nýggja Tjóðleikhúsið, staðsetingin er sera miðsavnandi, hóskandi í stødd, lætt atkomulig, bæði fyri gangandi og koyrandi.

## 5.3. Burðardygd

Tjóðleikhúsið skal planleggjast og projekterast við atliti at burðardygd í mun til føroysk viðurskifti og haldbæri. Val av tilfari og skipanum skal lýsast í mun til burðardygd og heildarkostnað. Burðardyggu evnini og avbjóðingarnar, sum eiga at verða lýstar í projekteringstíðarskeiðinum, eru:

1. Val av orkuveiting, sum ynskiligt í størst møguligan mun er varandi orka.
2. Val av orkuvinarligum tøkniskipanum/útbúnaði.
3. Val av tilfari, sum er orkuvinarligt og burðardygt.
4. Val av orkuvinarligum ruskskipanum og goymslum.
5. Livitíðin av bygninginum, soleiðis at bygningurin er mótstøðuførur mótvegis framtíðar veðurlagsbroytingum.
6. Viðlíkahald og rakstur av bygninginum.

## 5.4. Ljóðviðurskifti

Tað er av stórum týdningi, at ljóðviðurskiftini eru nøktandi, bæði í mun til óljóð frá skipanum í bygninginum og óljóð frá uppatliggjandi bygningum og virksemi í nærumhvørvinum.

Ljóðviðurskiftini í ymisku hølunum skulu vera hóskandi í mun til virksemið í rúminum, t.d. er av stórum týdningi, at pallurin verður ljóðtryggjaður við eini ljóðslúsu, soleiðis at virksemi upp at pallinum ikki órógvar sýningar ella venjingar inni á pallinum. Verkætlanartilfarið skal lýsa ljóðstøðið í ávísa rúminum og ljóðkrøv til bygningslutir millum rúm. Útrokningar av rúmunum, sum skjalprógva, at ljóðgóðskan er nøktandi, og at krøvini eru rokkin, kunnu krevjast fyri serlig virksemi og skulu tískil vera til taks.

Óljóð frá ventilatiónini o.ø. skipanum skal vera sbrt. galdandi krøvum. Tað er serliga týdningarmikið, at tílíkar skipanir ikki gera ristingar og óljóð undir venjing og sýning.

## 5.5. Inniumhvørvið

Skipanir skulu tryggja, at hitin í rúmunum er hóskandi til virkisøkið í rúminum, og at stýringin kann gerast skynsamt.

Luftskiftisskipanir skulu tryggja góðskuna á inniluftini sbrt. galdandi ásetingum. Fyrilit skal havast fyri, at skipanirnar eru einfaldar at stýra bæði í mun til orku og virkisøki.

Val av tilfari skal tryggja, at góð luftgóðska er í rúmunum – tilfar skal í minst møguligan mun lata bitlar ella damp frá sær.

Dentur skal leggjast á at fáa dagsljós inn í rúmini, har krav er um tað, og sostatt venda rúmini í mun til virkið. Harumframt skal tryggjast, at arbeiðsplássini við dagsljósi ikki blindast av dagsljósinumskála. Kunstljós skal tryggja nøktandi ljós til virkið í rúmunum.

## 5.6. Fólk við breki

Bygningurin skal skipast soleiðis, at fólk við breki kunnu njóta upplivingarnar á sama støði sum fólk, ið ikki bera brek. Fólk í koyristóli skulu kunnu koma inn í bygningin gjøgnum somu høvuðsdyr, sum fólk uttan koyristól.

Leikhússalirnir skulu sniðgevast soleiðis, at fólk í koyristóli hava atkomumøguleika, og at í minsta lagi 4 pláss í hvørjum sali eru til fólk í koyristóli.

Tryggjast skal, at hoyriveik og sjónveik verða hugsað inn í samlaðu heildina. Fyri sjónveik kunnu litmótsetningar, serliga í mun til tilfar á gólvum, veggjum, trappum, rampum o.s.fr. vera ein hjálp. Fyri hoyriveik er tað týdningarmikið við góðum ljóðskipanum í sambandi við sýningar og við eitt nú móttøkuna. Harumframt skal skipan hugsast inn, soleiðis at tann hoyriveiki kann fylgja sýningini.

## 5.7. Virkisøkini í Tjóðleikhúsinum

Í sambandi við bygging av nýggja Tjóðleikhúsinum er tað týdningarmikið, at ymisku virkisøkini verða staðsett hóskandi í mun til ávísa virksemið í rúmunum. Tað er av týdningi, at virksemið er í hásæti, so at arbeiðsgongdin á Tjóðpalli Føroya verður so góð sum møguligt.

Í "Fylgiskjal 03_Sambandið millum virkisøkini" sæst eitt diagramm/yvirlit yvir, hvussu ymisku virkisøkini eru knýtt at hvørjum øðrum.

Áskoðaratalið í verandi Tjóðpalli er sera skiftandi. Tað liggur millum 7.400 – 12.200 árliga. Hetta kemur av, at játtanin ikki er nóg stór til at útinna tað virksemið og lúka tey krøv, ið lógin ásetur viðvíkjandi leikverkum. Hetta hevur við sær, at nøkur ár verða leikir spældir, ið eru til eina smalri áskoðarafjøld. Meðan onnur ár skemtileik, familjuleik o.s.fr. Tá ið smærri barnaleikir verða spældir, koma nógvir dagstovnar at hyggja, og økir hetta áskoðaratalið munandi. Ynskiligt er at fáa eitt javnari virksemi, so at ójavnin á áskoðaratalinum ikki verður so stórur.

Virksemið í einum Tjóðleikhúsi kann býtast upp í 6 virkisbólkar:
- Pallar
- Verkstøð
- Goymslur
- Tøknirúm
- Starvsfólkarúm
- Almenn rúm

Heitini í sær sjálvum lýsa virkisøki, men verða krøv og ynski til virkisøkini lýst í eftirfylgjandi brotum.

### 5.7.1. Pallar

Undir virkisbólkinum "pallar" eru:
- Stórur pallur
- Lítlil pallur
- Blackbox

Felags fyri henda virkisbólkin er, at:
- serlig trygdarkrøv skulu fylgjast
- serlig ljóðkrøv eru til hesi hølini við eitt nú ljóð- og ljósslúsu
- at hesi høli krevja størri hugsavnan og arbeiðsfrið
- eingi vindeygu skulu vera í hesum hølum
- serútbúnaður skal projekterast til ymisku pallarnar
- tað skal vera møguleiki fyri at gera skjót skift í beinum sambandi við hølini – bæði klædnaskift og logistikkur
- pallgólvini, umframt trekk/brúgvar o.l. upphang skulu vera nóg sterk til at kunna bera tungar vektir
-

| **Navn** | **Ynskilig vídd á palli:** | **Hædd:** | **Lýsing/serlig krøv:** |
|---|---|---|---|
| Stórur pallur/salur | 10mx13m, umframt orkestur-grøv og áskoðara-pláss | Torn á 22m uppi yvir sjálvum pallinum | - Stóri salur skal hava pláss fyri 200 áskoðarum, føst áskoðarapláss.<br>- Ynskiligt er, at áskoðaraplássini í lítla sali og stóra sali kunnu leggjast saman, soleiðis at stóri salur kann hava 300 áskoðarapláss.<br>- Áskoðaraplássini skulu skráa oman móti pallinum.<br>- Ynskiligt er, at pallopið er uml. 10m breitt og 7m høgt.<br>- Undir stóra pallinum skal vera pallkjallari til pallskift. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | - Síðupall báðumegin pallin.<br>- Hóskandi orkesturgrøv til uml. 35 tónleikarar skal vera framman fyri pallin, t.e. millum pallin og áskoðaraplássini. Orkesturgrøvin skal gerast soleiðis, at møguligt er at seta áskoðarapláss á orkesturgrøvina.<br>- Møguligt skal vera hjá leikarunum at flyta seg úr einari síðu á pallinum í aðra uttan fyri palløkið, t.e. umvegis gongd/ljóðslúsuna kring pallin.<br>- Stóri pallur skal kunna læsast av, so at virksemið ikki verður órógvað.<br>- Stóri pallur skal hava samband við ljósbrúgvar umvegis lyftu. Ljósbrúgvarnar eru uppi yvir pallinum og áskoðaraplássunum og eru í beinleiðis sambandi við ljós- og ljóðverkstaðin og goymsluna til hesi.<br>- Fríhædd á ljósbrúgvunum skal vera sbrt. krøvum frá arbeiðseftirlitinum.<br>- Ynskiligt er, at pallurin kann stillast í hædd. |
| Stórur síðupallur<br>Lítil síðupallur | - 10mx13m<br>- 5mx13m | - 7m<br>- 4m | - Stóri síðupallur er til pallmyndir o.a. Hesin skal hava samband til verkstøðini (snikkara-, sveisi- og málingaverkstað), umframt til blackboxina.<br>- Atkoma við lastbili til pallmyndir skal vera beinleiðis til stóra síðupallin.<br>- Lítli síðupallurin verður nýttur til tekniska útgerð og stýring av pallteppum o.s.fr. |
| Lítli pallur | - 10mx15m | - 7m | - Lítli pallurin skal hava uml. 100 áskoðarapláss.<br>- Pallurin verður nýttur til smærri framsýningar og til venjingarhøli, repetitión, dansisal, raddarvenjing, upphiting o.s.fr., áðrenn farið verður á stóra pall at venja og sýna. Møguleiki skal somuleiðis vera fyri fysiskum teatri/dansi, sum eisini kann brúkast til uppstrikað venjingarrúm.<br>- Áskoðaraplássini skulu kunna skráa oman móti pallinum. Møguleiki skal vera fyri, at tey kunnu goymast burtur og/ella setast upp á ymiskan hátt.<br>- Løtt atkoma við pallmyndum og útgerð skal vera til lítla pallin.<br>- Spegl til dansarar skal vera á tí eina vegginum. |
| Blackbox | - 15mx15m | - 7m | - Blackbox er eitt høli við svørtum veggjum.<br>- Blackbox hevur flytilig áskoðarapláss.<br>- Stólagoymsla til uml. 100 stólar skal vera uppat.<br>- Blackboxin verður nýtt til venjingarhøli, repetitión, dansisal, raddarvenjing, upphiting o.s.fr., umframt sýningar. Møguleiki skal somuleiðis vera fyri fysiskum teatri/dansi, sum eisini kann brúkast til uppstrikað venjingarrúm. |

## 5.7.2. Verkstøð

Undir virkisbólkinum "verkstøð" eru:

- Snikkaraverkstaður

- Málingaverkstaður
- Smiðja og sveisiverkstaður
- Ljós- og ljóðverkstaður
- Ljóð- og videostudio
- Seymistova
- Rekvisittverkstaður
- Hár og sminka
- Litverksmiðja og vaskirúm

Felags fyri virkisøkini smiðju og sveisi-, snikkara-, og málingaverkstaðirnar er, at:

- Av tí at virksemið í verkstøðunum fevnir um arbeiði við ymiskum tilfari og evnum, ið kunnu vera dálkandi og eldfim, skal serligt atlit takast at hesum.
- Virkisøkini eru knýtt at hvørjum øðrum.
- Goymsla/ur til rávørur er/u í beinleiðis sambandi við verkstaðirnar.

Ynskiligt er, at hesir verkstaðirnir hava samband, sum stuðlar undir arbeiðsgongdina.
Ofta er arbeiðsgongdin henda:

1. Rammur til pallmyndir verða sveisaðar/settar saman og fluttar til snikkaraverkstaðin.
2. Pallmyndirnar verða bygdar upp á rammurnar og fluttar til málingaverkstaðin.
3. Á málingaverkstaðnum verða pallmyndirnar málaðar og fluttar til síðupallin, har tær verða endaliga settar saman.

| **Navn** | **Ynskilig vídd:** | **Hædd:** | **Lýsing/serlig krøv:** |
|---|---|---|---|
| Smiðja og sveisiverkstaður | 40 $m^2$ | 7m | - Smiðja og sveisiverkstaður er eitt rúm, har alt jarnsmíð verður gjørt til pallmyndir.<br>- Her verður allur fínmekanikkur somuleiðis gjørdur. |
| Snikkaraverkstaður | 90 $m^2$ | 7m | - Snikkaraverkstaður er til timburarbeiði í sambandi við pallmyndir. |
| Málingaverkstaður | 35 $m^2$ | 7m | - Málingaverkstaður er verkstaður til at mála pallmyndir. |
| Ljós- og ljóðverkstaður | 20 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Umvælingar av tøkniligum tólum (projektørum o.ø.)<br>- Staðsetast saman við ljósgoymsluni og nær við ljósbrúgvarnar. |
| Ljóð- og videostudio | 12 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Ljóðupptøkur og redigering av ljóð- og videoupptøkum verða gjørdar her. Videoupptøkur verða vanliga gjørdar í øðrum rúmum og eisini uttan fyri húsið. Størri ljóðupptøkur (orkestur við fleiri tónleikarum) verða gjørdar uttan fyri húsið.<br>- Sum partur av ljóð- og videostudio er kontrolrúm. |
| Seymistova | 60 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Í seymistovuni verða búnarnir gjørdir.<br>- Møguligt skal verða at ganga rundan um stórt arbeiðsborð, sum er 150cm x 200cm til víddar.<br>- Gólvpláss skal somuleiðis vera, soleiðis at møguligt er at leggja klæði á gólvið at arbeiða við.<br>- Ynskiligt er við 2 skiftirúmum við spegli.<br>- Tilfarsgoymslan (uml. 15$m^2$) er partur av rúminum – t.e. í egnum rúmi ella í stórum skápum.<br>- Neyðugt er, at seymistovan er nær við litverksmiðjuna og vaskirúmið. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | - Ynskiligt er, at seymistovan er staðsett tætt við hár og sminku.<br>- Umráðandi er, at seymistovan er við góðum ljósi, og at ljósið kann flytast á skinnarum.<br>- Hurðin inn í seymistovuna skal vera dupult, soleiðis at stór ting kunnu flytast inn og út úr rúminum.<br>- Útsúgving skal vera yvir øllum arbeiðseindum.<br>- Seymistovan skal vera við pressu.<br>- Ynskiligt er, at pláss er fyri lítlum skrivborði<br>- Ynskiligt er við innbygdari støvsúgvaraskipan. |
| Litverksmiðja og vaskirúm | 20 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Rúmið er vátrúm, har klædnavask og klædnaliting fer fram, og skal vera við frárensli.<br>- Til klædnaliting verða skaðilig evni nýtt, og tískil skulu skipanir, so sum útluftingarskipanir, hava fyrilit fyri hesum.<br>- Vaskimaskinur o.s.fr. skulu vera industrimaskinur.<br>- Neyðugt verður við stórum arbeiðsborði við vaski.<br>- Neyðugt verður við kari at lita í, og skal karið vera við vatnslangu o.l.<br>- Møguligt skal vera at turka klæðini á snóratræi ella í turkirúmi/skápi.<br>- Litverkstaðurin skal vera við kemikaliuskápi. |
| Rekvisittverkstaður | 20 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Á rekvisittverkstaðnum verða rekvisittir tillagaðir og gjørdir.<br>- Virksemið er knýtt at smiðju & sveisi-, snikkara- og málingaverkstøðunum, men ikki er neyðugt, at tað er staðsett við beinleiðis sambandi til hesi. |
| Hár og sminka | 20 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Rúmið er ein lítil hárfríðkanarstova við 4 hárfríðkanarstólum og hárvaskistóli. Rúmið skal hava gott ljós, spegl, punktútsúgving, stálvask og stálborðplátu.<br>- Rúmið virkar somuleiðis sum verkstaður, har eitt nú parykkar, maskur o.a. verður gjørt. Uppi yvir hesum arbeiðsstaðnum skal vera útsúgving.<br>- Goymsla til tilfar er í skápum í hølunum, umframt at serlig kemikaliuskáp eru til vandamikið tilfar.<br>- Ynskiligt er, at hár og sminka eru staðsett í tøttum sambandi við seymistovuna. |

### 5.7.3. Goymslur

Undir virkisbólkinum "goymslur" eru:

- Rágoymsla til smiðju & sveisi-, snikkara- og málingaverkstað
- Goymsla til útgerð (ljós og ljóð)
- Goymsla til búnar
- Goymsla til rekvisittverkstað
- Teppi- , stóla- og leyspallagoymsla

| Navn | Ynskilig vídd: | Hædd: | Lýsing/serlig krøv: |
|---|---|---|---|
| Rágoymsla til smiðju & sveisi-, snikkara- og málingaverkstað | 75 $m^2$ | 7m | - Rágoymslan fevnir um goymslu av tilfari til ymisku verkstøðini (timbur, jarn o.s.fr.). Tilfarið skal kunna skipast í eindir.<br>- Í rágoymsluni skal serskilt rúm/goymsla gerast til dálkandi og vandamikið tilfar (liting, máling o.s.fr.)<br>- Rágoymslan skal vera staðsett soleiðis, at lastbila-atkoma er møgulig.<br>- Rágoymslan skal somuleiðis staðsetast í beinleiðis sambandi við verkstøðini. |
| Goymsla til útgerð (ljós og ljóð) | 50 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Goymsla til ljós- og ljóðútgerð skal vera saman við ljós- og ljóðverkstaðnum og skal samstundis vera í tøttum sambandi við ljósbrúgvarnar. |
| Goymsla til búnar | 100 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Ynskiligt er, at goymslan verður skipað sum arkivgoymsla.<br>- Ikki er neyðugt, at staðseting er í tøttum sambandi við verkstøð og pallar. |
| Goymsla til rekvisittverkstað | 100 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Goymslan fevnir um goymslu av rekvisittum, møblum o.s.fr.<br>- Ikki er neyðugt, at staðseting er í tøttum sambandi við verkstøð og pallar, tó skal vera møguligt lættliga at flyta rekvisittirnar til pallarnar. |
| Teppi-, stóla- og leyspallagoymsla | 100 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Goymslan fevnir um alt pallinnbúgv.<br>- Stólar til blackboxina verða eisini goymdir í hesi goymsluni.<br>- Skal staðsetast upp at stóra síðupallinum. |

### 5.7.4. Tøknirúm til virksemið

Undir virkisbólkin "tøknirúm til virksemið" eru:

- Demparарúm
- Kontrolrúm

| Navn | Ynskilig vídd: | Hædd: | Lýsing/serlig krøv: |
|---|---|---|---|
| Demparарúm | 15 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Demparарúm fevnir um rúm, har útgerð til ljós- og ljóðstýring av pallinum er staðsett. Slag av demparaskipan kann avgera, um neyðugt er við rúmi til demparanar.<br>- Hølið skal staðsetast við beinleiðis sambandi til kontrolrúmið.<br>- Gott luftskifti skal tryggjast.<br>- Støða má takast til, hvussu demparaskipanin verður skipað í mun til pallarnar, eisini við atliti at heildarkostnaðinum. |
| Kontrolrúm | 20 $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Kontrolrúmið er rúm fyri seg, har glasrútur vendir ímóti stóra pallinum. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | - Kontrolrúmið skal staðsetast aftan fyri áskoðaraplássini í tí stóra pallinum við góðum yvirliti yvir pallin.<br>- Neyðugt er við góðari útlufting og køling.<br>- Í kontrolrúminum er neyðugt við talvum til Ethernet DMX og ljóð til alt húsið, so at møguligt er at taka tráðleyst niður yvir netið til ljóð, ljós, intercom, video, o.a.<br>- Neyðugt er, at tað er møguligt at lata upp millum kontrolrúm og sal, tá ljóð verður blandað. |

### 5.7.5. Tøknirúm til húsið

Undir virkisbólkinum "tøknirúm til húsið" eru:

- El-talvurúm
- Ventilatiónsrúm
- Fýrrúm/hitatøknirúm

| **Navn** | **Ynskilig vídd:** | **Hædd:** | **Lýsing/serlig krøv:** |
|---|---|---|---|
| El-talvurúm | - $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Støddin á rúminum skal vera nøktandi í mun til tørvin. |
| Ventilatiónsrúm | - $m^2$ | - | - Støddin á rúminum skal vera nøktandi í mun til tørvin.<br>- Hølið skal staðsetast skynsamt í mun til luftskiftið í húsinum og ymisku virksemini. |
| Hitatøknirúm | - $m^2$ | Vanlig rúmhædd | - Støddin á rúminum skal vera nøktandi í mun til tørvin.<br>- Hølið skal staðsetast skynsamt í mun til loysn av hitaskipan og í mun til virksemið í húsinum. |

### 5.7.6. Starvsfólkarúm

Undir virkisbólkinum "starvsfólkarúm" eru:

- Skiftirúm
- Felags tilhaldsrúm
- Matarstað til starvsfólk
- Vesi við bað
- Skrivstovur
- Fundarhøli
- Kopi/print

| **Navn** | **Ynskilig vídd:** | **Hædd:** | **Lýsing/serlig krøv:** |
|---|---|---|---|
| Skiftirúm | 125 $m^2$. | Vanlig rúmhædd | - Skiftirúmið fevnir um rúm til leikarar, bæði undir venjing og sýning. Í skiftirúminum verður búni skiftur, sminka løgd, og annars er klædnagoymsla til búnar til venjingar og sýningar.<br>- Tilsamans skulu 20 skiftipláss vera. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | - Skiftirúmini kunnu skipast í ymiskar støddir , t.d. kann man skipa rúmini, so 2 ella fleiri kunnu vera um hvørt skiftirúmið.<br>- Vesi og bað skulu vera í beinleiðis sambandi við skiftirúmini, tó í minsta lagi 5 vesir við bað. |
| Felags tilhaldsrúm | 50 m² | Vanlig rúmhædd | - Rúm, har leikarar og teknikarar halda til, meðan bíðað verður eftir at skula á pallin at spæla, skifta pallmynd o.a.<br>- Partur av hesum rúminum verður innrættaður til sminku- og búnaskifti.<br>- Tilhaldsrúmið skal hava lítlan tekøk. |
| Matarstað til starvsfólk | 30 m² | Vanlig rúmhædd | - Høli til matarsteðg hjá starvsfólkunum.<br>- Matarstaðið skal hava lítlan køk.<br>- Matarstaðið skal vera staðsett tætt við umsitingina og hava gott dagsljós. |
| Vesir | Uml. 10 stk á 4 m². | Vanlig rúmhædd | - Nøktandi nøgd av vesum skal staðsetast til ymisku starvsfólkahølini. |
| Skrivstovur | 45 m² | Vanlig rúmhædd | - 4 skrivstovur skulu gerast til stjórn og umsiting.<br>- Stjóraskrivstovan skal hava fundarborð til 6 fólk. |
| Fundarhøli | 40 m² | Vanlig rúmhædd | - 2 fundarhøli skulu gerast, harav 1 stórt til størri fundir uml. 20 fólk.<br>- Fundarhølini kunnu eisini hugsast at brúkast til repetitión, raddarvenjing, upphiting og venjingarhøli av ymiskum slagi. |
| Kopi/print | 10 m² | Vanlig rúmhædd | - Kopi og prentrúm skal verða partur av skrivstovuøkinum. |

### 5.7.7. Almenn rúm

Undir virkisbólkinum "almenn rúm" eru:
- Komuhøll
- Garderoba
- Vesir
- Kaffistova/bar
- Móttøka/atgongumerkir
- Sølubúð/handil

| **Navn** | **Ynskilig vídd:** | **Hædd:** | **Lýsing/serlig krøv:** |
|---|---|---|---|
| Komuhøll | 100 m² | Í minsta lagi vanlig rúmhædd | - Komuhøllin er tilhaldsøkið hjá vitjandi og skal vera opið og innbjóðandi. |
| Garderoba | 70 m² | Í minsta lagi vanlig rúmhædd | - Garderoban skal vera til í minsta lagi 200 gestir, og møguleiki skal vera fyri at hava mannaða garderobu.<br>- Garderoban skal vera í tøttum sambandi við komuhøllina. |
| Vesi | 60 m² | Vanlig rúmhædd | - Nøktandi vesi í mun til tal á vitjandi skulu gerast til bæði kyn og til rørslutarnað. |
| Kaffistova/bar | 70 m² | Í minsta lagi vanlig rúmhædd | - Kaffistovan/barrin skal hava allar neyðugar hentleikar. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | - Kaffistovan/barrin skal vera í beinleiðis sambandi við komuhøllina, soleiðis at møguligt er at nýta komuhøllina sum part av kaffistovuni.<br>- Ynskiligt er, at kaffistovan/barrin er sjónlig uttanifrá. |
| Móttøka/atgongu-merki | 10 $m^2$ | Í minsta lagi vanlig rúmhædd | - Móttøkan skal vera sjónlig í komuhøllini og skal rúma 2 starvsfólkum. |
| Sølubúð/handil | 20 $m^2$ | Í minsta lagi vanlig rúmhædd | - Møguligt skal vera at skipa eina sølubúð sum part av komuhøllini í tøttum sambandi við móttøkuna. |

### 5.7.8. Samlað rúmyvirlit

Í "Fylgiskjali 02_Rúmyvirlit" sæst eitt samlað yvirlit yvir øll rúmini, sum skulu vera í Tjóðleikhúsinum.

# 6.0. Skipan av byggiøkinum

## 6.1. Lendið

Økið, har bygt verður á, er partvís uppfylt øki, og harvið skal tryggjast, at vatn ikki treingir inn í bygningin frá undirlendi, íroknað havinum. Tryggjast skal eisini, at møgulig ávirkan, so sum undir- og yvirtrýst frá undirlendinum, ikki er til ampa fyri bygningin. Væta annars skal veitast burtur frá bygninginum á nøktandi hátt. Byggiharrin skipar fyri, at kanningar verða gjørdar av lendinum.

## 6.2. Økið uttanum

Bygningarnir og økið uttanum skulu laga seg til heildarætlanina fyri Skálatrøð. Víst verður til serstøku byggisamtyktina fyri økið.

Dentur skal leggjast á, at góðar umstøður eru hjá starvsfólkum og vitjandi at vera uttanfyri.

Ynskiligt er, at økið uttan fyri høvuðsdyrnar er skipað soleiðis, at vitjandi ganga skógvarnar turrar, áðrenn komið verður inn til høvuðsdyrnar.

Økið uttanum og planting skulu lagast til veðurlagið á staðnum, so at verja frá vindi er á uppihaldsøkjunum. Plantusløg skulu veljast, ið eru harðbalin í mun til veður. Val av plantum skal vera grundgivið í mun til hetta.

## 6.3. Atkomuvegir

Ferðslan í økinum verður skipað sambært heildarætlanini fyri Skálatrøð. Víst verður til "Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini", sum lýsir, hvussu ferðslan verður skipað á økinum.

Tryggjast skal, at møguligt er at seta fólk av við høvuðsdyrnar til Tjóðleikhúsið.

Fyrilit skal havast fyri, at størri akfør skulu kunna koyra inn í goymsluna og stóra síðupallin við vørum til verkstøðini og leikpallarnar.

Brandbilar, sjúkrabilar o.s.fr. skulu hava góðar atkomumøguleikar og skulu sleppa heilt til dyrnar. Serstøku krøvini til atkomumøguleikar hjá tilbúgvingini skulu fylgjast.

## 6.4. Parkering

Parkering í økinum verður skipað sambært heildarætlanini fyri Skálatrøð.

Parkering til Tjóðleikhúsið verður partur av parkeringshúsinum, sum byggjast skal sambært heildarætlanini. T.e. at fíggjarligi parturin av parkeringsplássum til Tjóðleikhúsið skal íroknast hesa verkætlan.

Ynskiligt er, at beinleiðis atgongd fyri vitjandi er frá parkeringshúsinum inn í Tjóðleikhúsið og beinleiðis inn í komuhøllina.

Parkering skal skipast sbrt. kap. 2.4.2 í Bygningskunngerðini frá 2017, ið ásetur at 1,0 parkeringspláss skal gerast pr. 25 m² av bygdari húsavídd.

## 6.5. Skipan av bygningunum

Av tí at byggingin er partur av heildarætlanini fyri økið Skálatrøð, sum í býarskipanini er lagt av til mentanarligt virksemi, eigur skipanin av bygninginum í størst møguligan mun at hava fyrilit fyri uppatliggjandi virksemi. Tórshavnar kommuna hevur ætlanir um at byggja annan mentanarstovn á økið og sambært heildarætlanini at gera eitt febitlarlags býarrúm millum bygningarnar á økinum.

Í "Fylgiskjal 03_Virkisøkini" sæst, hvussu virkisøkini eru knýtt at hvørjum øðrum. Fylgiskjalið er gjørt fyri at lýsa, hvussu bygginevndin hugsar sær, at virkisøkini verða staðsett í mun til hvørt annað og er ætlað at verða nýtt sum íblástur til loysn av verkætlanini.

# 7.0. Tøkni og veitingar

Tøknin í leikhúsum er av alstórum týdningi fyri virksemið, og skulu serlig atlit verða tikin at neyðugum rúmkrøvum. Tøknin skal hugsast inn og loysast frá byrjan í projekteringstíðarskeiðinum, soleiðis at bygningurin kann rúma allari tøknini, og at hon kann innbyggjast á skynsaman hátt og soleiðis, at alt er við frá byrjan.

Útgreinaði krøv til tøkniskipanir/tøkniútbúnað (ljóð, ljós, video, net, innleggingar, innleggingarlutir, innleggingarslokur, føringsvegir o.s.fr.) skulu veljast, samansetast og nýtast sum fyriskrivað í tilhoyrandi reglum, krøvum, vegleiðingum og normum. Útgreinað krøv til ymisku tøkniskipanirnar/útbúnaðin eru partur av framhaldandi projekteringsarbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

Skipanir/útbúnaður/stýringar skulu lýsast og veljast í mun til livitíð, viðlíkahald, burðardygd og heildarkostnað, eisini við atliti at orkunýtslu. Harumframt skulu skipanirnar/útbúnaðurin setast soleiðis, at rakstur og viðlíkahald kunnu gerast á nøktandi hátt.

Niðanfyri nevndu skipanir/útbúnaður skulu lúka nevndu krøv, umframt at fylgja viðkomandi faknormum.

## 7.1. Veitingar (til bygningin)

Allar veitingar, so sum el, vatn, tele, kloakk, eru í økinum, og skal bygningurin knýtast at verandi veitingum. Um veitingin á økinum ikki er nøktandi í mun til virksemið í Tjóðleikhúsinum, skulu veitingarnar økjast eftir tørvi.

Skipanir skulu fyrireikast og gerast, so at bygningurin er so orkuvinaligur sum til ber í mun til upphiting og rakstur.

Bindast skal í verandi kloakkskipan og vatnveiting í økinum sambært krøvum frá Tórshavnar kommunu. Tele - og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Útgreinað krøv til veitingarnar eru partur av framhaldandi arbeiðinum og verða at skjalfesta sambært viðkomandi faknormum.

## 7.2. Innleggingar (í bygninginum)

Allar innleggingar skulu projekterast við støði í galdandi normum og standardum.
Dentur skal leggjast á, at loysnir og val av tilfari hava eina góðsku, ið svarar til støðið fyri leikhús í Norðanlondum.

Bindast skal í verandi skipanir í økinum sambært krøvum frá leiðingseigarum og Tórshavnar kommunu.
Innleggingar skulu skipast soleiðis, at neyðug røkt av skipanum kann gerast á fullgóðan hátt.
Innleggingar skulu í størst møguligan mun leggjast soleiðis til rættis, at innrætting, rakstur og viðlíkahald gevur minst møguligt órógv fyri virksemi og brúkarar í húsinum, harumframt skal øll útgerð í størst møguligan mun verða orkuvinalig.

Virksemið í Tjóðleikhúsinum krevur nógva tøkni, og skulu allar innleggingar samskipast í mun til virksemi, skipanir og bygningin á besta hátt.

**Innleggingarslokur:**
Slokur til innleggingar skulu leggjast skynsamt í mun til virksemið, soleiðis at larmur, ristingar og hiti ikki hava vansar fyri viðkvom rúm.

Góð atgongd skal vera til at skifta lutir í slokum, og fyrilit skal havast fyri, at hetta kann gerast uttan, at tað er neyðugt at taka aðrar innleggingar sundur. Atgongd skal vera til slokur í øllum hæddum, og í mun til arbeiðstrygd skal gólv vera í øllum hæddum í slokum.

**Innleggingar til bygningin eru m.a.:**
Hiti, vatn, kloakk og el.

Hiti: Skipanir skulu fyrireikast og gerast, soleiðis at minst møgulig orka verður brúk til upphiting og rakstur av bygninginum.

Uppskot til møguligar hitaskipanir skulu lýsast í mun til burðardygd og heildarkostnað sum grundarlag hjá byggiharra at taka avgerð út frá.

Hitaskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsama upphiting av bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

Vatn: Drekkivatnsskipanir skulu skipast soleiðis, at krøv til drekkivatn altíð eru rokkin, og at tryggjað er ímóti tæring í skipanini. Partar av vatnskipanini, ið ikki brúka vatn vanliga, t.d. brandskáp, spulikranar og tílíkt, skulu verða íbundin á tann hátt, at krøv til drekkivatnsgóðskuna støðugt eru rokkin fyri aðrar skipanir.

Frárenningar: Frárenningar í bygninginum skulu skipast í størst møguligan mun soleiðis, at tørvur ikki er á at pumpa frárenningar. Verður neyðugt við pumpum, skulu tær staðsetast uttan fyri bygningin.

Feittbrunnar frá køksfrárenningum skulu staðsetast uttan fyri bygningin og verða atkomuligir at tøma við slamsúgvara.

Frárenningarskipanin skal tryggjast móti rottum.

Frárenningarleiðingar skulu ikki førast gjøgnum ljóðviðkvæm rúm. Um hetta krav ikki kann røkkast, skulu leiðingar ljóðbjálvast, soleiðis at óljóð ikki verður frá skipanini til rúmið.

Neyðug útlufting frá frárenningarskipan skal tryggjast. Útlufting skal staðsetast og skipast soleiðis, at luktur ikki verður til ampa fyri virksemið í bygninginum, hugsast skal um staðseting í mun til luftinntak til luftskiftisskipanir, vindeygu, ið lata upp o.a.

El: El-skipanin skal nøkta allar skipanir í mun til virksemi í bygninginum. El-skipanir skulu tillagast virkseminum við atliti at fleksibiliteti í mun til framtíðar rakstur og røkt á best møguligan hátt.

Bygningurin skal projekterast soleiðis, at øll rúm og verkstaðir skulu vera við nóg nógvum stikkkontaktum, skipaðar í eindir. Hugsað verður eitt nú um verkstaðirnar "hár og sminka" og "seymistovuna".

Tryggjast skal, at potentialmunir millum ymiskar installatiónir ikki hava ampa við sær og gera skaða.

Innleggingar skulu í størst møguligan mun vera uttan blýggj og PVC.

Føringsvegir: Allir føringsvegir skulu leggjast til rættis, soleiðis at innleggingar eru væl skipaðar og ruddiligar og lætt atkomuligar fyri broytingum og útbyggingum.

Innleggingarbakkar skulu taka atlit at ymisku skipanunum, soleiðis at tær eru skipaðar hvør sær á skynsaman hátt. Føringsvegir skulu brunatryggjast í mun til brunaklassar.

## 7.3. Luftskifti

Luftskiftisskipanir skulu projekterast við støði í galdandi normum og standardum.

Luftgóðska og luftskifti í einum leikhúsi eru týðandi fyri góðskustøðið í bygninginum, og kunnu tískil vera umfatandi og plásskrevjandi. Luftskiftisskipanir skulu gerast soleiðis, at bygningurin í størst møguligan mun endurvinnur avlopshitan.

Tað eru ymisk krøv til ymiskt luftskifti í leikhúsinum, t.d. kann nevnast, at salirnir krevja serliga luftskiftisskipan, sum hevur fyrilit fyri stóru rúmdini, ikki gevur óljóð frá sær og kann halda nøktandi hita og inniluft í salinum bæði undir venjing og sýning.

Luftskiftisskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsamt luftskifti í bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

## 7.4. Ljós

Serlig atlit skulu takast at ljósi í Tjóðleikhúsinum. Ljósið kann býtast í hesar høvuðsbólkar:

- Dagsljós.
- Arbeiðsljós. T.e. ljós til venjing í salunum, í skiftirúmunum o.s.fr.
- Stemningsljós. T.e. ljós í eitt nú salinum, har fólkini sita, í komuhøllini, har ein serligur stemningur skal haldast o.s.fr.
- Útiljós og orienteringsljós. T.e. ljós á útiøki og høvuðsljós, har høvuðsferðslan er í bygninginum.
- Rýmingarljós. T.e. ljós, sum verður kravt sambært brunareglunum.
- Sýningarljós. T.e. ljós á pallinum til sjálva sýningina.
- Byggilistarligt ljós. T.e. ljós at lýsa byggilistina.

Bygningurin skal skipast soleiðis, at nytta fæst frá dagsljósi í teim rúmum, har tað hóskar seg. Ljósið undir sýning verður stýrt úr kontrolrúminum, meðan arbeiðsljós í salinum, í skiftirúmunum o.s.fr. verður stýrt manuelt ella partvís sjálvvirkið. Stemningsljós í komuhøll og líknandi hølum, umframt ljós til at lýsa byggilistina verður stýrt av starvsfólkunum í Tjóðleikhúsinum.

Neyðugt er at hugsa viðlíkahald av ymiska ljósinum inn beinanvegin í projekteringstíðarskeiðinum.

## 7.5. Palltøkni

Palltøknin er umfatandi í Tjóðleikhúsinum. Atlit skulu takast at innleggingunum í salinum, so sum skipanum at flyta ting runt á pallinum, vognum, brúgvum, lyftum, flogkervi o.s.fr. Nógv av hesi tøknini er mekanisk og krevur nógv pláss, og sostatt skal tøknin hugsast inn beinanvegin í projekteringstíðarskeiðinum, umframt ravmagnið, sum skipanirnar brúka.

## 7.6. Ljóð, video og samskifti

Ljóð, video og samskifti fevnir um útbúnað, sum tekur upp og spælir ljóð og video.

Talan er um:

1. Útbúnað til áskoðararnar í salinum
2. Útbúnað til innanhýsis samskiftið
3. Útbúnað til upptøkur til eitt nú sjónvarp og útvarp

Til útbúnaðin er neyðugt at tryggja, at nøktandi leiðingar og útgerð eru kring allan bygningin.

Í salinum er tað týdningarmikið við neyvari planlegging av hátalarum, soleiðis at nøktandi ljóð er í salinum undir sýning.

Staðsetingin av kontrolrúminum skal vera soleiðis, at starvsfólkið hevur gott yvirlit.

## 7.7. Tele og net

Tele og net fevnir um teldunet, tráðleysar skipanir, videosambond, telduskipanir, skermar, útbúnað í sølubúðum o.s.fr. Allar hesar skipanir krevja samskipan, ið krevja neyva sniðgeving og integratión.

Tele - og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Tráðleyst samband skal vera í øllum bygninginum, umframt fast samband, ið eisini í hóskandi mun skal vera í arbeiðsrúmum.

Útgreinað krøv til net- og teleskipan eru partur av framhaldandi arbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

## 7.8. Dempararúm

Um avgerð verður tikin um, at dempararúm skal vera í Tjóðleikhúsinum, so skal støddin og staðsetingin av rúminum til skipanirnar staðsetast hóskandi í mun til pallarnar. Tað er somuleiðis av týdningi, at skipanirnar verða neyvt planlagdar í mun til pallarnar.

# 8.0. Krøv og ynski til bygningslutir

Allir bygningslutir skulu gerast, samansetast/byggjast og nýtast sum fyriskrivað í tilhoyrandi reglum, krøvum, vegleiðingum og normum. Útgreinað krøv til bygningslutir eru partur av framhaldandi projekteringsarbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

Val av tilfari skal vera av høgari góðsku í mun til haldbæri og ellidæmi. Bygningslutirnir hvør sær skulu hava langa livitíð og gerast soleiðis, at viðlíkahaldið er so avmarkað sum til ber. Niðanfyri eru nakrir bygningslutir nevndir:

Vátrúm, so sum høli til reingerð, vesirúm, køkur o.l, skulu vátrúmstryggjast.
Konstruktiónir
Konstruktiónirnar skulu dimensionerast og eftirvísast sambært galdandi faknormum við tilhoyrandi donskum anneksum. Val av konstruktiónum skal vera kent og tryggja skynsaman byggihátt.

Atlit skulu sýnast at føroyska veðurlagnum, og skulu konstruktiónirnar dimensionerast til eina vindlast svarandi til 50 m/s. Konstruktiónirnar skulu vera haldgóðar í mun til regn, kava og vind.

Berandi konstruktiónir skulu fyrireikast og gerast við atliti at størst møguligum fleksibiliteti.

Konstruktiónir, sum eru úr betong og standa berar, skulu dustbindast.

## 8.1. Framsíður

Snið og val av tilfari og bygningslutum í framsíðunum skal fremjast við atliti at heildarupplivingini, umframt veðrinum (sól, regn og vindi).

Valda tilfarið skal ikki krevja ov nógv viðlíkahald við atliti at heildarkostnaðinum, og dentur eigur at verða lagdur á at fáa vakurt ellidæmi við tíðini.

Partur av framsíðunum eru vindeygu og hurðar.

## 8.2. Skilaveggir

Skilaveggir og glaspartíir skulu lúka styrkis-, ljóð- og brunakrøv. Skilaveggir skulu vera lættir og skulu kunna setast upp og takast niður eftir tørvi, uttan at tað ávirkar berandi konstruktiónina. Skilaveggir skulu gerast úr tilfari við neyðugari styrki at bera veggjahongd innbúgv og útbúnað.

Gjøgnumføringar í skilaveggjum skulu ljóðtettast og í mest møguligan mun leggjast inn frá felagsøkjunum. Í sambandi við ljóðdoyving millum rúmini, so er neyðugt at hava fyrilit fyri ætlaða virkseminum í rúmunum.

Har tað er neyðugt, skal glas í hurðum og glaspartíum verða persónstryggjað við avbyrging og/ella sjónligari merking.

Í vátrúmum skulu serlig fyrilit havast fyri tættleikanum í vátrúmsøkinum, eisini har ymiskt tilfar verður bygt saman, so sum millum vegg og gólv og í hornum.

Skilaveggir, sum eru úr betong og standa berir, skulu dustbindast og tryggja góða ljóðgóðsku.

## 8.3. Gólv

Gólv skal vera úr slitsterkum tilfari. Tilfarsvalið skal taka atlit at, at tey vitjandi ganga inni í skóm. Gólvið skal veljast í mun til ymiska virksemið í húsinum, tó vera hóskandi í mun til hvørt annað.

Pallgólvini skulu gerast soleiðis, at tey tola tunga útgerð.

Høvuðsinngongdin skal hava gólválegging við hita, umframt máttur e.l., sum tryggjar, at skógvarnir verða gingnir turrir/reinir.

## 8.4. Loft

Loftini í almennu rúmunum og í umsitingini skulu gerast og fyrireikast soleiðis, at innleggingar goymast. Loftini skulu tryggja góð ljóðviðurskifti, umframt vera løtt at halda rein.

Niðurhongd loft skulu kunna takast niður á hóskandi støðum, so tað slepst til tøkniligar innleggingar alla staðni, har tað er neyðugt, og uttan at loftini farast av hesum.

Um ber betongloft verða, so skulu hesi vera dustbundin og tryggja góða ljóðgóðsku í mun til virksemið.

## 8.5. Útgerð

Øll útgerð, so sum brúgvar, konstruktiónir o.l. skal gerast og fyrireikast soleiðis, at útgerðin tolir nýtsluna, umframt at útgerðin tolir at tung ting hanga í útgerðini.

# 9.0. Krøv og ynski til list, innbúgv og útbúnað

## 9.1. Listprýði

Tjóðleikhúsið skal listprýðast á høgum listarligum støði, og kostnaðurin skal íroknast verkætlanina. Listprýðing skal samskipast millum byggiharra, listafólk og ráðgeva.

## 9.2. Innbúgv og útbúnaður

Trupult er at meta um ítøkiliga tørvin á innbúgvi, eitt tílíkt hús hevur tørv á, men er hetta partur av verkætlanini og skal íroknast verkætlanina. Skipanaruppskotið skal hava fyrilit fyri tørvinum á nýggjum innbúgvi.

Tjóðleikhúsið skal hava innbúgv og útbúnað, sum eitt tílíkt hús krevur.

Krav til fleksibilitet í húsinum krevur væntandi, at innbúgv og útbúnaður verða loyst saman við sniðgevingini.

Eitt nú krevur ein nútímans pallur nógvan serstakan útbúnað, umframt innbúgv (stólar o.s.fr.). Somuleiðis krevst ymiskt innbúgv til eitt nú sminkurúm, tilhaldsrúm, komuhøllina o.s.fr.

# 10.0. Fíggjarlig viðurskifti

## 10.1. Stigbýti og raðfestingar

Kostnaðarmetingin ásetur ein samlaðan kostnað fyri alla verkætlanina áljóðandi 180 mió.kr.
Kostnaðarmeting er deild upp í 3 stig.

Stig 1.:
Fyrireiking, leiðsla, ráðgevaraútboð og skipanaruppskot Kr. 3,0 mió.kr.
Byrjaði í 2011 og endar 21.01.2020

Stig 2.:
Projektering og leiðsla Kr. 12,0 mió.kr.
Byrjar 22.01.2020 og endar 11.01.2021

Stig 3.:
Leiðsla, eftirlit, útboð, bygging, innbúgv og tól Kr. 165,0 mió.kr.
Byrjar 12.01.2021 og endar 12.09.2024

Íalt ein samlaður tørvur á 180 mió.kr. Av hesum má ekstern fígging fáast til vega áljóðandi 120 mió.kr.

# 11.0. Tíðaráætlan

Víst verður til “Fylgiskjal 04_Tíðarætlan”.

# 12.0. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)

HTU skal verða ein týðandi partur av verkætlanini í prosjektering, útinning, rakstri og viðlíkahaldi, og starvsfólk skulu hava eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði í tilgongdini til verkætlanina, undir bygging og tá bygningurin er tikin í nýtslu.

## 12.1. Heilsa trygd og umhvørvi

Skyldur javnført ásetingunum í arbeiðsumhvørvislóggávuni og umhvørvislóggávuni skulu fylgjast.

Tryggjast skal, at ásetingarnar í "*Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø*", ið er sett í gildi fyri Føroyar við "*kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss*" við fylgiskjølum, verða fylgdar. Listi yvir loysnir innan arbeiðsumhvørvisviðurskifti, sum eru út yvir tað vanliga, skal gerast.

Ráðgevi skal í prosjektering tryggja, at byggiarbeiðið í mest møguligan mun verður framt í vanligari arbeiðstíð, tó kann henda, at neyðugt verður at skipa nakað av byggiarbeiðinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Skipað samstarv skal verða millum byggifeløg, byggileiðslu, fakeftirlitið og starvsfólk, harundir byggifundir, sum meginregla verða hildnir hvørja ella aðruhvørja viku. Trygdarrunda og fundir verða sum meginregla hildnir 4. hvønn dag.

Tryggjast skal, at byggiarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tað sum heild verður til minst møguligan ampa fyri kringumstøðurnar. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað elvir til minst møguligt óljóð, dálking og ferðslu í umhvørvinum. Fyribils ávísingar og vegleiðandi skelti skulu setast upp í samstarvi við byggiharran og avvarðandi kommunu.

HTU-ætlanin hjá Landsverki skal takast við í felagstreytunum. Sí fylgiskjal 05_HTU-ætlan. Tilfar og upplýsingar til HTU-ætlanina frá ráðgeva og arbeiðstakara skal latast tí, sum vegna byggiharra er HTU-samskipari (trygdar-/arbeiðsumhvørvissamskipari).

# 13.0. Rakstur & Viðlíkahald (R&V)

Bygningurin skal sniðgevast og gerast, soleiðis at rakstur og viðlíkahald av bygninginum verður skynsamt.

Val av tilfari skal stuðla upp undir skynsaman rakstur og viðlíkahald, umframt at val av tilfari skal tryggja, at yvirflatir á gólvum, veggjum og loftum eru lættar at halda reinar.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu vera atkomuligir og skulu vera settir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi. Tað skal eisini gerast gólvpláss til at kunna umvæla lutir á staðnum. Luftskiftisrør skulu verða sett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja rørskipanina.

Nøktandi pláss skal gerast bæði framman fyri og aftan fyri fastar innleggingar og bygningslutir.

Verkætlanin skal projekterast í Revit, og hevur ráðgevin til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "as built" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran.
Harumframt hevur ráðgevin ábyrgdina av, at øll rakstrar-, eftirlits- og vegleiðingarskjøl (REV) verða latin byggiharranum.
Endamálið við rakstrar- & viðlíkahaldsætlanini, R&V, er at tryggja eitt framhaldandi, nøktandi R&V. R&V skal leggjast til rættis og passast til raksturin av bygninginum annars. Í samljóði við funktiónskrøvini í byggiskránni, skal viðlíkahaldsstøðið verða viðvirkandi til at røkka dygdar- og haldgóðari bygging:

Byggiharri krevur í hesari verkætlan talgilda avhending. Tað er galdandi fyri allar upplýsingar, sum kunnu hava ávirkan á framtíðar rakstrarskeiðið. Treytirnar eru galdandi fyri allar arbeiðstakarar í verkætlanini.

Í hesum stykki eru yvirskipað krøv lýst, við tí endamáli at halda funktionella og fíggjarliga virðið í bygningi og fríøkjum, herundir byggilist, -tøkni og dygd.

## 13.1. Prosjektering (R&V)

Bygningurin skal sniðgevast og gerast, soleiðis at R&V av bygninginum verður skynsamt. Allir byggilutir skulu framleiðast sbrt. galdandi og dagførdum vegleiðingum frá viðurkendum stovni/virki/framleiðara.
Val av tilfari og loysnum skal eggja til skynsaman R&V og tryggja:

- Eitt optimalt inniklima, uttan ampar.
- Ein tættan og byggitøkniliga rætt útførdan klimaskerm.
- Góðar og tryggar umstøður fyri brúkarar og gestir í bygningi og útiøkjum.
- Vælvirkandi og orkurættar tøknuligar innleggingar.
- Byggitøkniliga rættar loysnir.
- Góðar atkomiligar loysnir.
- Orkurættar loysnir.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu verða lætt atkomuligir og skulu verða staðsettir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa, umvæla og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi, herundir:

- Luftskiftisrør og rør í síni heild skulu verða staðsett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja skipanina.
- Eftirlitslúkur herundir KT, El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.

- Talvir og skýggjar fyri KT, El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Lyftiútgerð
- Brunaútgerð
- Atkomueftirlit
- Allir tøkniligar lutir v.m.

## 13.2. Gransking (R&V)

Valdar loysnir skulu granskast, og verkætlanartilfarið skal góðskutryggjast viðvíkjandi rakstri og viðlíkahaldi fyri allar fasur í prosjekteringini. Gransking skal sum minsta mark fevna um:

- Byggibæri
- Byggitøkni
- Orkuatlit
- Inniklima
- Atkomu
- Fólkatrygd
- Reingerð
- Viðlíkahald
- Rakstur
- Kostnað av teim omanfyri nevndu

Góðskutrygging skal sum minsta mark fevna um:

- Nøktandi støði á verkætlanartilfari
- Eintýtt verkætlanartilfar
- Kollisiónsgreining millum fakbólkar
- Greið og fullfíggjað markamót
- Samsvar millum tekningar
- Samsvar millum skjøl
- Tíðarætlan
- Kostnaðarætlan

## 13.3. Avhendan (R&V)

Verkætlanin skal prosjekterast í Revit, og hava ráðgevar til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "sum bygt" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran og IKT avtalu.

R&V deild byggiharrans treytar sær fullan nýtslurætt til tekningar og annað tilfar, sum latið inn sbrt. IKT avtalu. Nýtslurætturin er tó bert galdandi fyri verkætlan, sum tekningar/skjøl eru virkað til. Øll viðkomandi skjøl skulu veitast í forsniði, sum greitt frá í IKT avtalu.

Harumframt hava ráðgevar og arbeiðstakarar ábyrgdina av, at øll **R**akstrar-, **E**ftirlits- og **V**egleiðingarskjøl (**REV**) verða latin byggiharranum.

Skjøl, sum skulu veitast, eru:

- Vegleiðingar fyri REV:

- Upplýsingar um allar byggilutir, elementir, komponentar og skipanir, herundir veitari, nágreining, merki, typa v.m.
- Reingerðarháttur & -evnir
- Viðlíkahalds- & umvælingarvegleiðingar, herundir úrtskifting av byggilutum, elementum, komponentum og skipanum.
- Evt. kunning, upplæring og skeið.

- Viðlíkahaldsætlan
  - 10 ára viðlíkahaldsætlan skal veitast

- Ætlan um rakstrarkostnað
  - Skjøl um væntaðan kostnað av rakstri, veiting, orkunýtslu og reingerð
  - Meting um rakstrarkostnað skal gerast fyri 10 ára skeið, við kostnaðarstøði frá avhendingardegi.

- Garantiskjøl
  - Allar givnar ábyrgdir/trygdir, herundir einkultvøra og samansettir byggilutir, skulu latast byggiharra við avhendan.

- Dátubløð
  - Rakstrarviðkomandi vørufrágreiðingar, serliga veitarans vørublað.

- Byggilutakort og sermyndir av samanbyggingum
  - Veruligar upplýsingar um byggilutir og komponentar, og herundir rakstrar- og viðlíkahaldsupplýsingar.

- Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar
  - Innregulering-, máti- og royndarfrágreiðingar, sum eru gjørdar, tá ið farið verður í gongd við verkløg.

- “Sum bygt” tekningar og diagramm
  - Allar tekningar og diagramm, sum nýtt eru í sambandi við bygging, uppseting, og tá ið farið verður í gongd við bygningar og verkløg.
  - Avtaluseðlar og skitsur.

- “Sum bygt” myndir
  - Allar myndir frá byggibyrjan til avhending
  - Myndir frá eftirlitinum
  - Myndir frá arbeiðstakara / veitara
  - Myndir frá byggileiðslu

## 13.4. Gransking og góðskutrygging

Ein góð gransking av eini verkætlan er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti. Gransking skal verða framd, meðan prosjekteringin er ávegis. Somuleiðis skal granskingin fylgja byggingini og veiting av byggieindum.

Gransking fevnir um innanhýsis gransking og tvørfakliga gransking. Byggiharrin varðar av gransking av øllum fasum. Tó frítekur hetta ikki ráðgeva fyri at hava interna gransking sambært sáttmála. Alt framleitt tilfar skal veitast byggiharra og uttanhýsis granskarum í uppruna forritum so sum Revit, Word e.l fyri

hvørt granskingarstig. Hetta er galdandi fyri byggiharra, byggiharraráðgeva og allar teir prosjekterandi partarnar fyri øll fak.

Minstamark fyri ráðgevaragransking eru ásetingarnar í "Ydelsesbeskrivelser 2012 – For Byggeri og Planlægning" kap. 3.
Fyri hvørt stig í prosjekteringini skal gransking fremjast og frágreiðing latast byggiharranum. Farast skal ikki undir næsta stig, fyrr enn góðkenning av undanfarna stigi fyriliggur frá byggiharra, og viðmerkingar eru arbeiddar inn í undanfarna stig.

# 14.0. Fylgiskjøl

Fylgiskjal 01_Skálatrøð í framtíðini (er viðlagt og ikki tongt í hesa byggiskrá)
Fylgiskjal 02_Virkisøkini
Fylgiskjal 03_Rúmyvirlit
Fylgiskjal 04_Tíðarætlan
Fylgiskjal_05_HTU ætlan



# SKÁLATRØÐ Í FRAMTÍÐINI

## - ein mentanardepil í høvuðsstaðnum

# Skálatrøð i framtíðini | innihaldsyvirlit

Í hesari mappu verða framtíðarætlanirnar fyri ein Tjóðpall á Skálatrøð lýstar. Mappan er ein samandráttur av teimum tankum og kanningum, ið eru grundarlag undir skipanini av økinum. Mappan er skipað í tveir partar.

Í fyrra partinum er ein stuttur innleiðingur til økið á Skálatrøð og tess samanhang við restina av miðbýnum umframt nýggju miðbýarætlanina fyri miðbýin. Síðani verður tikið samanum og víst verður á fyrimunir við at staðseta tjóðpallin í økinum og hvussu Skálatrøð í framtíðini kann skipast við tveimum mentanarligum funktiónum umframt økt fokus á betri býarrúm og nýggj atkomuviðurskifti.

Seinri partur inniheldur meira útgreinað tilfar og kanningar, ið eru grundarlag undir teimum ætlanum, ið eru vístar í fyrra partinum av mappuni. í seinra partinum eru tað serliga parkeringsviðurskifti, 3D-forkanningar og støddir á eini komandi bygging á Skálatrøð, ið verða lýst.

## 1. Partur | Skálatrøð i framtíðini


skálatrøð | ein partur av mentanarásini í miðbýnum....síða 3
skálatrøð | fyrimunir og møguleikar fyri tjóðpallin....síða 4
skálatrøð | yvirskipað skipan av økinum....síða 5

atkomuviðurskifti | 1. byggistig - tjóðpallur....síða 6
atkomuviðurskifti | 2. byggistig - langtíðarætlan....síða 7

samanbering | volumekanningar....síða 8
samanbering | Skálatrøð og framtíðin....síða 9

tilvísingar | mentanarhús við søguligan bryggjukant....síða 10
tilvísingar | bygningur og býarrúm smelta saman....síða 11


## 2. Partur | Útgreiningar og volumekanningar


parkering | støðd og prinsipp....síða 13
parkering | aðrir møguleikar....síða 14

tjóðpallur | salur og stødd....síða 15

volumekanning | nr. 1 - parkeringshús á Skálatrøð....síða 17
volumekanning | nr. 2 - parkeringshús sprongt inn í lendið....síða 19
volumekanning | nr. 3 - smalt parkeringshús fram við beni....síða 21
volumekanning | nr. 4 - smalt parkeringshús fram við beni....síða 24
volumekanning | nr. 5 - smalt parkeringshús fram við beni....síða 26
volumekanning | nr. 6 - parkeringhús + parkering við Gríms Kambans gøtu....síða 28

# **skálatrøð** | ein partur av mentanarásini í miðbynum

Ein týdningarmikil partur av nýggju miðbýarætlanini er at skapa lív í miðbýin. Hetta skal gerast við at nýta fleiri ymiskt amboð m.a. við at samanseta funktiónurnar miðbýnum meira fjøltáttað. Miðbýurin eigur í framtíðini at hava eitt størri úrval av íbúðum, skrivstovum, handilshølum umframt umstøður til ymisk býar- og mentanartiltøk. Saman fara ymisku funktiónurnar at styrkja hvørja aðra og skapa ein spennandi og livandi høvuðsstað.

Ein umráðandi partur av at tryggja hetta margfeldi er týdningurin av eini sterkari mentanarás gjøgnum miðbýin, og tað er í hesum samanhangi at Skálatrøð hevur ein avgerandi leiklut. Ein bygging á Skálatrøð við áherðslu á mentanartiltøk er ein tiltrongdur styrkur av mentanarásini í miðbýnum og kann vera við til at styrkja lívið í miðbýnum eftir at handlarnir hava latið aftur.




**SKÁLATRØÐ - EIN NYGGJUR MENTANARDEPIL**

Herfyri hevur Tórshavnar kommuna umvælt Reinsaríðið, nýggj uppihaldstrappa verður gjørd í Vágsbotni umframt nýtt spælipláss í Grasagarði. Hetta eru dømi um tiltøk, ið styrkja mentanarásina í miðbýnum. Ein mentanardepil á Skálatrøð ger eisini sítt til at styrkja hesa mentanarás og hevur við sær økt lív í miðbýin.




**GONGUFRÁSTØÐA FRÁ STEINTATÚNI - GÓÐ ATKOMUVIÐURSKIFTI FYRI ØLL**

Staðsetingin av mentanarfunktiónum og ymiskum upplivingar-funktiónum á Skálatrøð ger tað lætt hjá øllum føroyingum at koma til og fáa gleði og gagn av hesum funktiónum. Hetta tí, at Steinatún er staðið har flest allir bussar steðga og stutt er til fleiri fráfaringarstøð hjá Bygdaleiðum. Hvat bilferðslu viðvíkir, kann roknast við, at mesta ferðslan til og frá mentanarfunktiónunum er eftir vanliga arbeiðstíð.

# **skálatrøð** | fyrimunir og møguleikar fyri tjóðpallin

Skálatrøð er ein einastandandi møguleiki at byggja í Tórshavn. Økið er kanska tað mest prominenta í Føroyum, mitt í høvuðsstaðnum, tætt upp at virkseminum í býnum annars við góðum sambandi til bryggjukantin og vágna.Staðsetingin eigur at vera ætlað bygging, ið hevur mentanarligan týdning fyri Føroyar og føroyingar allar.

Í hjálagda tilfari verður ein røð av innleiðandi kanningum og møguleikum í sambandi við staðseting av nýggjum tjóðpalli á Skálatrøð víst. M.a. verður hugt at atkomuviðurskiftum, parkeringsmøguleikum og støddini á ymisku funktiónunum á staðnum.



**STAÐSETING MITT Í HØVUÐSSTAÐNUM**

Skálatrøð liggur sera væl fyri í mun til handilslív, mentanarfunktiónir og matstovur, ið eru í miðbýnum.



**FRAMÚR SJÓNLIG STAÐSETING**

Við at staðseta tjóðpallin á Skálatrøð gerst hann rættuliga sjónligur, og møguleikarnir fyri fruktagóðum samspæli við miðbýin og býarlívið annars eru góðir.



**MØGULEIKI AT GAGNNÝTA BERGIÐ**

Verandi berg kann gagnnýtast á ymiskar mátar og t.d. skapa atgongd til eitt parkeringtak, betri samband frá Gríms Kambansgøtu til kaiøkið, og eitt nýtt grønt rúm í býnum.



**BETRI SAMBAND VIÐ BRYGGJUKANT**

Bryggjukanturin kann hugsast saman við ella sum nátúrligur partur av bygginginí á økinum. Hugsandi er, at virksemið í húsinum við útsíðum, ið til ber at lata upp ella við uttandura pallum, kann víðkast út á økini rundan um bygningarnar.

# skálatrøð | yvirskipað skipan av økinum

Fyri at gera Skálatrøð til ein sterkan mentanardepil, kann Tjóðpallurin, ið fyrst og fremst er aktivur um kvøldið, kombinerast við aðrar dag-funktiónir sum t.d. bókasavn, borgarahús og líknandi. Á hendan hátt verður økið aktivt so stóran part av samdøgrinum sum gjørligt. Við at staðseta fleiri mentanar-funktiónur í økinum er eisini møguligt at skapa eina synergi-effekt, har ymisku funktiónirnar stuðla hvørja aðra. Møguleiki er eisini at hava funktiónir sum t.d. café í felag.

Skálatrøð er í dag týdningarmesta parkeringspláss í miðbýnum. Í sambandi við bygging á økinum, er tískil neyðugt at hugsa parkeringsviðurskifti sum ein part av uppgávuni.



**PARKERING MÓTI BERGI**

Parkeringshús verður staðsett móti bergi, aftanfyri eitt møguligt tjóðleikhús og eina triðju funktión sum t.d. bókasavn. Samstundis verður ferðslan leidd burtur frá bryggjukantinum.



**TJÓÐPALLUR VESTUREFTIR**

Lagt verður upp til, at Tjóðpallurin, sum er stórur í vavi við fleiri pallum, verður staðsettur vestarlaga á økinum, har økið hevur størst vídd og har møguleikarnir at byggja høgt eru bestir.



**MENTANARFUNKTIÓN HJÁ TK EYSTUREFTIR**

Hin (dag)mentanarfunktiónin verður staðsett eystureftir, sum ein lægri bygningur, ið betri hóskar til smærru bygningarnar í miðbýnum og eisini kann virka innbjóðandi móti Vágsbotni og á henda hátt skapa samband víðari út eftir Skálatrøð.




**NÝTT BÝARRÚM FYRI GANGANDI**

Fram við bryggjukantinum, millum báðar mentanarfunktiónirnar og møguliga upp á takið á bygningunum kann pláss vera fyri einum nýggjum býarrúmi, ið serliga er ætlað fólki til gongu til uppihald og leik. Rúmið kann eisini verða hugsað saman við virkseminum í bygningunum báðum.

# **atkomuviðurskifti** | 1. byggistig - tjóðpallur

Í dag kemst til Skálatrøð úr Vágsbotni og Sigmundargøtu. Í sambandi við bygging av einum parkeringshúsi inn ímóti berginum á Skálatrøð, er møguligt at skipa eina til- og frákoyring við nýggjari leið frá Gríms Kambans gøtu. Núverandi atkomuviðurskifti verða sostatt ikki broytt, men ein nýggj atkoma verður gjørd afturat teimum verandi. Um til- og frákoyringarviðurskifti verða skipað aftan fyri byggingina á Skálatrøð, er møguligt at "innrætta" bryggjukantin serliga til fólk til gongu. Sostatt kann fáast eitt attraktivt býarrúm beint út til sjógvin og vágna.



# **atkomuviðurskifti** | 2. byggistig - langtíðarætlan

Í framtíðini kann ein nýggj høvuðs-atkomuleið eftir Skiparagøtu gerast, soleiðis at atkoma til parkeringshúsið verður leidd eftir Gríms Kambansgøtu og Skiparagøtu. Hetta fer at minka um bilferðsluna fram við bryggjukantinum á Skálatrøð og í Vágsbotni, ið soleiðis kann gerast eitt attraktivt torg til alskyns tiltøk. Havnin fær sostatt eitt einastandandi rekreativt øki mitt í býnum. Møguleikar fyri lokalari ferðslu og ørindiskoyring til tjóðpallin kann integrerast í býarrúmið saman við betri atgongd til bátarnar.



# **samanbering** | volumekanningar

Út frá tí yvirskipaðu ætlanini av økinum og ynskjunum um stødd á Tjóðpallinum, eru fleiri 3D-kanningar gjørdar, ið við tekningum og myndum lýsa ymisku parkerings-uppskotini og støddina á hesum. Allar volumekanningarnar eru at finna í seinra partinum av hesari mappu.

Talan er um yvirskipaðar kanningar av víddum og rúmd-støddum (volumen), og er ikki eitt boð uppá sjálvt sniðið á bygningunum. Endamálið við kanningunum er at geva eina mynd av, hvussu nóg-vum parkeringsplássum pláss er fyri á økinum, tá pláss eisini skal vera fyri einum tjóðleikhúsi og einari mentanarfunktión á 3000 m² hjá Tórshavnar kommunu. Volume-kanningarnar geva eisini eina mynd av tí 22m høga senutorninum og einum parkeringshúsi í 3 hæddum.

Um tað ikki verður mett at vera gjørligt at spreingja allan ella ein part av parkeringshúsinum inn í lendið, eins og tað eru víst dømi um í seinra partinum av mappuni, verður mælt til, at arbeitt verður víðari við einari loysn, sum víst í volumekanning nr.4.

Ein loysn, sum tann ið er víst í volumekanning nr. 4, ger tað møguligt at staðseta bygningarnar nærri berginum, soleiðis at betri pláss verður fyri grøna býarrúminum frammanfyri bygningarnar. Í mun til kanning nr. 1-3 fæst tað við kanning nr. 4 eitt meira hóskandi lutfall millum bygt og óbygt øki á Skálatrøð.

### Volumekanning nr. 1





### Volumekanning nr. 2





### Volumekanning nr. 3





### Volumekanning nr. 4





# **samanbering** | Skálatrøð og framtíðin

Við útgangsstøði í volumekanning nr. 4 verður lagt upp til, at Skálatøð í framtíðini skal skipast einum parkeringshúsi í vestara parti av økinum, móti berginum við atkomuvegi frá Gríms kambans gøtu. Í hesi loysn er møguligt at spreingja eitt ella fleiri hæddir niður undir veg ella inn í bergið móti Gríms kambans gøtu.

Vestureftir verður nýggi bygningurin hjá Tjóðpalli Føroya staðsettur. Bygningurin kemur við sínum høga senutorni at markera seg á Skálatrøð út móti Vestaru Vág. Tjóðpallurin verður staðsettur framman fyri parkeringshúsið og kann møguliga eisini verða bygdur saman við parkeringshúsinum og á tann háttt "goyma" hend alutfallsliga stóra bygning á økinum.

Eystureftir verður parkeringshúsið stytt nakað móti Bøgøtu, soleiðis at pláss verður fyri einari mentanarfunktión afturat bygninginum hjá Tjóðpalli Føroya. Staðsetingin og støddin á hesum bygningi kundi hóskandi tikið atlit til smærru bygningarnar, ið standa eystan fyri Skálatrøð, og á henda hátt verið viðvirkandi til eina hóskandi yvirgongd til Vágsbotn.

Um Skálatrøð skal vera eitt innbjóðandi og vælvirkandi býarrúm í framtíðini, er umráðandi, at rúmið millum hesar mentanarbygningar verður skipað á rættan hátt. Um rætt verður farið fram er møguligleiki at skapa eitt heilt serligt býarrúm millum bygningarnar og vágna.



**EIN NYGGJUR MENTANARDEPIL - SAMVIRKAN MILLUM FUNKTIÓNUR**

Staðsetingin av ymiskum mentanarfunktiónum á Skálatrøð gevur góðar møguleikar fyri samvirkanarárin millum funktiónurnar, samstundis sum hetta kann gera økið til ein sannan mentanarmiðdepil. Nýggju funktiónurnar á Skálatrøð vilja vera viðvirkandi til at styrkja mentanarásina úr Tórsgøtu umframt at skapa lív á økinum eftir vanliga arbeiðtíð.




**EITT NÝTT OG INNBJÓÐANDI BÝARRÚM Í HØVUÐSSTAÐNUM**

Bryggjukanturin og býarrúmið millum nýggju mentanarfunktiónurnar á Skálatrøð kann gerast eitt heilt serligt býarrúm í Høvuðsstaðnum, ið eisini kann styrka virksemi Undir Bryggjubakka og Vágsbotni og miðbýnum annars. Við at innrætta býarrúmið til uttandura virksemi, kann hetta verða nýtt saman við nýggju mentanarbygningunum og skapa karmarnar um uttandura tiltøk og framførðslur á Skálatrøð.























# Útgreiningar og volumekanningar



# parkering | stødd og prinsipp

Eitt parkeringshús kann skipast uppá fleiri mátar, kanska serliga við atliti at sirkulatiónsprinsippum. Einsrættað sirkulatión gevur smidliga ferðslu, meðan ferðsla báðar vegir ger tað møguligt at hava fleiri inn- og útkoyringar í ymiskum hæddum. Fyrst má støða takast til funktión í mun til langtíðar ella stutttíðarparkering, tørv á at leita eftir plássi, møg.elektronisk ávísing til parkering, um parkeringsgjald skal vera ella ikki o.s.fr., ikki fyrr enn tað er greitt, ber til at fastleggja snið á parkeringshúsinum.

## parkeringsprinsipp







60° parkering




45° parkering

## sirkulatiónsprinsipp



báðar vegir



báðar vegir - blindur



einvegis

## innkoyringsprinsipp



snigil



1-hædd rampa



½-hædd rampa

# P parkering | aðrir møguleikar

Støddin á einum nýggjum parkeringshúsi veldst um, í hvønn mun øll núverandi 200 parkeringsplássini á Skálatrøð skulu vera í einum parkeringshúsi. Alternativt kunnu stødd og dominansur á bygninginum í økinum minkast við at arbeiða við ymiskum loysnum sum takparkering, parkeringskjallara o.s.fr. Mælt verður til at bjóða til arkitektakapping um snið á parkeringshúsi sum part av Tjóðpallinum, soleiðis at bygningarnir báðir so væl sum gjørligt kunnu síggjast sum ein heild.



**PARKERINGSHÚS 200 PLÁSS**

Eitt parkeringshús í 3 hæddum við plássi til 200 bilar krevur uml. 6000 m2 og fevnir um stóran part av Skálatrøð.




**SJÓNLIG TAKPARKERING**

Takvíddin á parkeringshúsinum kann takast við sum fjórða hædd og harvið minka støddina á bygninginum. Tað hevur so við sær, at møguleikin at hava eitt grønt býarrúm á takinum er burtur.




**VÍÐKAN INN Í FJALLIÐ**

Parkeringshúsið kann fyri ein part spreingjast inn í verandi bergvegg. Harvið sæst ein partur av parkeringshúsinum ikki.




**PARKERINGSKJALLARI**

Parkeringshúsið kann víðkast "niðureftir" við parkeringskjallara. Á Henda hátt verður stórur partur av p-húsinum fjaldur.




**STAÐSETING AÐRASTAÐNI Í MIÐBÝNUM**

Parkeringshúsið kann t.d. innrættast við 150 p-plássum, meðat tey írestandi 50 plássini kunnu skipast aðrastaðni í miðbýnum.



**PARKERING OG MENTAN BLANDAÐ**

Parkeringshúsið kann goymast sum ein integreraður partur av nýggju byggingini, t.d. við at størsti partur av niðastu hædd er parkering.

Bygginevndin fyri tjóðpallin hevur gjørt eitt fyribils yvirlit yvir ymisku pallarnar, ið síðan hevur verið grundarlag undir eftirfylgjandi volume-kanningunum.




**STÓRUR PALLUR**

Væntað stødd á stóra palli við senutorni, orkes-turgrøv og áskoðaraplássum til 200 áskoðarar.




**STÓRUR OG LÍTIL SÍÐUPALLUR**

Væntað stødd á síðupalli til leiktjøld, tekniska útgerð, stýring av pallteppum osfr.




**LÍTLI PALLUR**

Væntað stødd á lítla palli, ið verður nýttur til minni framsýningar og til venjingarhøli.




**BLACK BOX**

Væntað stødd á black box'ini, ið hevur flytilig áskoðarapláss og verður nýtt til venjingarhøli umframt sýningar

# tjóðpallur | salur og stødd

Umframt senurnar er tørvur á verkstøðum, skrivstovum, atkomuhøli (foyer), café v.m. Bygginevndin hevur upplýst, at samlaða støddin á tjóðpallinum er 3000m².










**PALLUR**

Ymisku senurnar og áskoðaraplássini umfata tilsamans 830 m² við ymiskum rúmhæddum.

**2 HÆDDIR RUNDAN UM SENURNAR**

Rundan um senurnar eru 2 hæddir, ið tilsamans eru 1070 m² til m.a. atkomuhøli (foyer), café og verkstað.

**OVASTA HÆDD**

Ovast, á 3. hædd, er ein full hædd á 1105 m² rundan um senutorn og áskoðarapláss til høvuðssenu.

# volumekanning | nr. 1 - parkeringshús á Skálatrøð

## Parkeringsprinsipp
- Tvívegis sirkulatión
- Gjøgnumkoyringsprinsipp
- Vinkulrøtt parkering
- Forskotnar hæddir - 8 hæddir

## Parkeringspláss

| | | |
|---|---|---|
| - Parkering í hús | = | 152 p-pláss |
| - Parkering á tak | = | 48 p-pláss |
| - Parkering á uttanum øki | = | 20 p-pláss |
| - Parkering í alt | = | 220 p-pláss |












11 m




11 m
9 m

## Parkeringsprinsipp

- Tvívegis sirkulatión
- Gjøgnumkoyringsprinsipp
- Vinkulrøtt parkering
- Forskotnar hæddir - 8 hæddir

## Parkeringspláss

| | | |
|---|---|---|
| - Parkering í hús | = | 132 p-pláss |
| - Parkering á tak | = | 44 p-pláss |
| - Parkering á uttanum øki | = | 20 p-pláss |
| - Parkering í alt | = | 196 p-pláss |









# **volumekanning** | nr. 2 - parkeringshús sprongt inn í lendið










# **volumekanning** | nr. 3 - smalt parkeringshús fram við beni

## Parkeringsprinsipp

- Tvívegis sirkulatión
- Gjøgnumkoyringsprinsipp / Blindvegaparkering
- Vinkulrøtt parkering
- Fullar hæddir - 4 hæddir

## Parkeringspláss

| | | |
|---|---|---|
| - Parkering í hús | = | 168 p-pláss |
| - Parkering á tak | = | 53 p-pláss |
| - Parkering á uttanum øki | = | 20 p-pláss |
| - Parkering í alt | = | 241 p-pláss |









# **volumekanning** | nr. 3 - smalt parkeringshús fram við beni

Møguleiki 1 - særskilt indkørsel (221 p-pláss í hús)




Møguleiki 2 - forbindelse mellem etager (193 p-pláss í hús)



# **volumekanning** | nr. 3 - smalt parkeringshús fram við beni










# **volumekanning** | nr. 4 - smalt parkeringshús fram við beni

## Parkeringsprinsipp

- Tvívegis sirkulatión
- Gjøgnumkoyringsprinsipp / Blindvegaparkering
- Vinkulrøtt parkering
- Fullar hæddir - 4 hæddir




## Parkeringspláss

| | | |
|---|---|---|
| - Parkering í hús | = | 126 p-pláss |
| - Parkering á tak | = | 39 p-pláss |
| - Parkering á uttanum øki | = | 20 p-pláss |
| - Parkering í alt | = | 185 p-pláss |






**volumekanning** | nr. 4 - smalt parkeringshús fram við beni










# **volumekanning** | nr. 5 - smalt parkeringshús fram við beni

## Parkeringsprinsipp

- Tvívegis sirkulatión
- Gjøgnumkoyringsprinsipp / Blindvegaparkering
- Vinkulrøtt parkering
- Fullar hæddir - 4 hæddir

## Parkeringspláss

| | | |
|---|---|---|
| - Parkering í hús | = | 124 p-pláss |
| - Parkering á tak | = | 31 p-pláss |
| - Parkering á uttanum øki | = | 20 p-pláss |
| - Parkering í alt | = | 175 p-pláss |









# **volumekanning** | nr. 5 - smalt parkeringshús fram við beni










# volumekanning | nr. 6 - parkeringhús + parkering við Gríms Kambans gøtu

## Parkeringsprinsipp

- Tvívegis sirkulatión
- Gjøgnumkoyringsprinsipp / Blindvegaparkering
- Vinkulrøtt parkering
- Fullar hæddir - 4 hæddir

## Parkeringspláss

| | | |
|---|---|---|
| - Parkering í hús | = | 168 p-pláss |
| - Parkering á tak (50%) | = | 82 p-pláss |
| - Parkering á uttanum øki | = | 20 p-pláss |
| - Parkering í alt | = | 270 p-pláss |









# **volumekanning** | nr. 6 - parkeringhús + parkering við Gríms Kambans gøtu










# Fylgiskjal 02_virkisøkini



LANDSVERK

## Fylgiskjal 03_Rúmyvirlit

| Virkisøkir | Krav: | Krav/ynski: | | | Hædd: |
|---|---|---|---|---|---|
| | Stødd: | Eindir: | Stødd m² | Samanlagt m² | Samalagt m |
| **Pallar** | | | | | |
| Stórur pallur/salur | 10x13m umframt orkestur grøv áskaoðarapláss | 1 | 400 | 400 | 22 |
| Stóri síðupallur | 10x13m | 1 | 130 | 130 | 7 |
| Lítli síðupallur | 5x13m | 1 | 65 | 65 | 4 |
| Lítli pallur | 10x15m | 1 | 150 | 150 | 7 |
| Black Box | 15x15m | 1 | 225 | 225 | 7 |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **970** | |
| | | | | | |
| **Verkstøð:** | | | | | |
| Smiðja og sveisiverkstaður | | 1 | 40 | 40 | 7 |
| Snikkaraverkstaður | | 1 | 90 | 90 | 7 |
| Málingaverkstaður | | 1 | 35 | 35 | Vanlig rúmhædd |
| Ljós- og ljóðverkstaður | | 1 | 20 | 20 | Vanlig rúmhædd |
| Ljóð- og videostudio | | 1 | 12 | 12 | Vanlig rúmhædd |
| Seymistova | | 1 | 60 | 60 | Vanlig rúmhædd |
| Litverksmiðja og vaskirúm | | 1 | 20 | 20 | Vanlig rúmhædd |
| Rekvisittverkstaður | | 1 | 20 | 20 | Vanlig rúmhædd |
| Hár og sminka | | 1 | 20 | 20 | Vanlig rúmhædd |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **317** | |
| | | | | | |
| **Goymslur:** | | | | | |
| Rágoymsla til smiðju-, snikkara- og málingaverkstað | | 1 | 75 | 75 | 7 |
| Goymsla til ljós og ljóð | | 1 | 50 | 50 | Vanlig rúmhædd |
| Goymsla til búnar | | 1 | 100 | 100 | Vanlig rúmhædd |
| Goymsla til rekvisittverkstað | | 1 | 100 | 100 | Vanlig rúmhædd |
| Teppi-, stóla- og leyspalla-goymsla | | 1 | 100 | 100 | Vanlig rúmhædd |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **425** | |
| | | | | | |
| **Tøknirúm til virksemi:** | | | | | |
| Dempararúm | | 1 | 15 | 15 | Vanlig rúmhædd |
| Kontrolrúm | | 1 | 20 | 20 | Vanlig rúmhædd |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **35** | |
| | | | | | |
| **Starvsfólkarúm:** | | | | | |
| Skiftirúm við vesi og bað | | 1 | 125 | 125 | Vanlig rúmhædd |
| Felags tilhaldsrúm | | 1 | 50 | 50 | Vanlig rúmhædd |
| Matarstað til starvsfólk | | 1 | 30 | 30 | Vanlig rúmhædd |
| Vesi við bað | | 10 | 4 | 40 | Vanlig rúmhædd |
| Skrivstovur | | 1 | 45 | 45 | Vanlig rúmhædd |
| Fundarhølir | | 1 | 40 | 40 | Vanlig rúmhædd |
| Kopi- og printrúm | | 1 | 10 | 10 | Vanlig rúmhædd |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **340** | |

## Fylgiskjal 03_Rúmyvirlit

| Virkisøkir | Krav: | Krav/ynski: | | | Hædd: |
|---|---|---|---|---|---|
| | Stødd: | Eindir: | Stødd m² | Samanlagt m² | Samalagt m |
| | | | | | |
| **Almenn rúm:** | | | | | |
| Komuhøll | | 1 | 100 | 100 | Vanlig rúmhædd ella meira |
| Klædnarúm | | 1 | 70 | 70 | Vanlig rúmhædd |
| Vesir | | 1 | 60 | 60 | Vanlig rúmhædd |
| Matstova og bar | | 1 | 70 | 70 | Vanlig rúmhædd |
| Móttøka/atgongumerkir | | 1 | 10 | 10 | Vanlig rúmhædd |
| Søla og handilsvirksemi | | 1 | 20 | 20 | Vanlig rúmhædd |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **330** | |
| | | | | | |
| **Tøkni o.a.** | | | | | |
| El-talvurúm | | 1 | 30 | 30 | |
| Ventilatións- og hitatøknirúm | | 1 | 300 | 300 | |
| Gangir og veggir | | | | 725 | |
| **Fermetrar tilsamans:** | | | | **1055** | |
| | | | | | |
| **Bygningsfermetrar tilsamans** | | | | **3472** | |
| | | | | | |
| **Uttanumøki** | | | | **250** | |
| **Parkering** | | | | **2500** | |
| | | | | | |
| **Fermetrar í alt** | | | | **6222** | **m²** |

| Id | | Opgavetil | Opgavenavn | Varighed | Startdato | Slutdato |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | **Tjóðpallur Føroya** | **1565 dage** | **on 29-08-18** | **to 12-09-24** |
| 2 | | | **Stig 1.** | **359 dage** | **on 29-08-18** | **ti 21-01-20** |
| 3 | | | Byggiprogram endaligt | 43 dage | on 29-08-18 | fr 26-10-18 |
| 4 | | | Politisk viðgerð | 40 dage | ma 29-10-18 | fr 21-12-18 |
| 5 | | | Játtan politiskt samtykt í FL2019 | 0 dage | ti 04-12-18 | ti 04-12-18 |
| 6 | | | Innheintan ekstern fígging | 120 dage | to 27-12-18 | on 12-06-19 |
| 7 | | | Byggiøki tøkt til forkanningar | 0 dage | fr 01-02-19 | fr 01-02-19 |
| 8 | | | Útboð undangóðkenning | 20 dage | to 13-06-19 | on 10-07-19 |
| 9 | | | Viðgerð av undangóðkenning | 10 dage | to 11-07-19 | on 24-07-19 |
| 10 | | | Útboð konseptkapping/arkitektakapping | 40 dage | to 25-07-19 | on 18-09-19 |
| 11 | | | Licitatión/framløgur/døming | 10 dage | to 19-09-19 | on 02-10-19 |
| 12 | | | Viðgerða av døming | 5 dage | to 03-10-19 | on 09-10-19 |
| 13 | | | Kunning og viðmæli | 5 dage | to 10-10-19 | on 16-10-19 |
| 14 | | | Kontrahering | 15 dage | to 17-10-19 | on 06-11-19 |
| 15 | | | Workshops - ráðgevi/brúkari | 10 dage | to 07-11-19 | on 20-11-19 |
| 16 | | | Skipanaruppskot | 30 dage | to 21-11-19 | ma 06-01-20 |
| 17 | | | Avlevering skipanaruppskot | 1 dag | ti 07-01-20 | ti 07-01-20 |
| 18 | | | Skipanaruppskot avlevera | 0 dage | ma 16-12-19 | ma 16-12-19 |
| 19 | | | Granking skipanaruppskot | 10 dage | on 08-01-20 | ti 21-01-20 |
| 20 | | | **Stig 2.** | **252 dage** | **on 22-01-20** | **ma 11-01-21** |
| 21 | | | Prosjektuppskot | 100 dage | on 22-01-20 | ti 09-06-20 |
| 22 | | | Avlevering prosjektuppskot | 1 dag | on 10-06-20 | on 10-06-20 |
| 23 | | | Gransking prosjektuppskot | 15 dage | to 11-06-20 | on 01-07-20 |
| 24 | | | Forprojekt/mynduleikaprojekt | 20 dage | to 02-07-20 | on 29-07-20 |
| 25 | | | Mynduleikaviðgerð | 40 dage | to 30-07-20 | on 23-09-20 |
| 26 | | | Høvuðsprojekt | 100 dage | to 30-07-20 | on 16-12-20 |
| 27 | | | Avlevering høvuðsprosjekt | 1 dag | to 17-12-20 | to 17-12-20 |
| 28 | | | Granking høvuðsprosjekt | 15 dage | fr 18-12-20 | ma 11-01-21 |
| 29 | | | **Stig 3.** | **954 dage** | **ti 12-01-21** | **to 12-09-24** |
| 30 | | | Undangóðkenning arbeiðstakarar | 20 dage | ti 12-01-21 | ma 08-02-21 |
| 31 | | | Viðgerð av undangóðkenning | 10 dage | ti 09-02-21 | ma 22-02-21 |
| 32 | | | Útboð arbeiðstakarar | 60 dage | ti 23-02-21 | ma 17-05-21 |
| 33 | | | Licitatión | 1 dag | ti 18-05-21 | ti 18-05-21 |
| 34 | | | Kontrahering | 15 dage | on 19-05-21 | ti 08-06-21 |
| 35 | | | Byggiøki tøkt til bygging | 0 dage | ti 08-06-21 | ti 08-06-21 |
| 36 | | | Bygging byrjar | 1 dag | on 09-06-21 | on 09-06-21 |
| 37 | | | Bygging | 800 dage | to 10-06-21 | ti 09-07-24 |
| 38 | | | Bygging endar | 1 dag | on 10-07-24 | on 10-07-24 |
| 39 | | | Manglar | 40 dage | to 11-07-24 | on 04-09-24 |
| 40 | | | Handan til byggiharra | 5 dage | to 05-09-24 | on 11-09-24 |
| 41 | | | Handan til bygningsánara | 1 dag | to 12-09-24 | to 12-09-24 |




Projekt: Høvuðstíðarætlan
Dato: to 25-10-18

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Opgave | | Projektoversigt | | Inaktiv milepæl | | Manuel oversigtsopløftning | |
| Opdeling | | Eksterne opgaver | | Inaktiv oversigt | | Manuel oversigt | |
| Milepæl | | Ekstern milepæl | | Manuel opgave | | kun start | |
| Hovedopgave | | Inaktiv opgave | | Kun varighed | | Kun slutdato | |

Deadline
Fremdrift

# Ætlan fyri Heilsu, Trygd og Umhvørvi
# HTU-ætlan

Navn á verkætlan:

| Mynd |
|---|

Vegleiðing til nýtslu av hesum frymlinum:
Bláur tekstur er vegleiðing og skal tískil strikast
Reyður tekstur eru dømir ella uppskot til tekst. Hesin kann brúkast, sum hann er, verða rættaður ella strikaður.
Svartur tekstur er tekstur, sum eigur at verða í HTU ætlanini.
Til seinast verður allur teksturin gjørdur svartur.

# Innihaldsyvirlit

1 Alment um HTU-ætlanina....4
2 Um verkætlanina....6
*2.1 Arbeiðsumhvørvispolitikkur hjá byggiharra.* ....6
3 Organisatión....Fejl! Bogmærke er ikke defineret.
*3.1 Aktørar og áhugabólkar*....6
*3.2 Trygdarskipanin*....6
*3.3 HTU-samskipari hjá byggiharra*....7
*3.4 Fráboðan um byggiplássið*....7
4 Tíðarætlan og verandi viðurskifti....8
*4.1 Verandi viðurskifti*....8
5 Innrættan av byggiplássinum....8
*5.1 Kunningartalvur*....8
*5.2 Tekning yvir byggiplássið*....8
6 Sera vandamikið arbeiðið og/ella aðrir serligir vandar....9
7 Trygdarviðurskifti á byggiplássinum....9
*7.1 Almennar trygdarreglur á byggiplássinum*....9
*7.2 Trygdartiltøk á felagsøkjum*....10
*7.3 Ruddiligt og vælskipað øki*....11
*7.4 Óljóð*....11
*7.5 Dust*....11
*7.6 Koyrandi og gangandi ferðsla*....11
*7.7 Lastbilar og bakking*....11
*7.8 Krøv í sambandi við íhøgging (Krøking)*....11
*7.9 Maskinur og útgerð*....11
*7.10 Dátubløð*....11
8 Eftirlit....12
*8.1 Trygdarrunda*....12
*8.2 Trygdarfundir*....13
9 Tilbúgving....13
*9.1 Ávaringarskipan í sambandi við persónsvanlukku/óhapp*....13

*9.2 Fráboðan av vanlukku/óhappi ........................................ 13*

10 Vegleiðing og upplæring ........................................ 14

11 Revsiatgerðir ........................................ 14


Fylgiskjøl

Fylgiskjal 1: Bygnaður

Fylgiskjal 2: Tíðarætlan

Fylgiskjal 3: Tekning av byggiplássinum

Fylgiskjal 4: Sera vandamikið arbeiði og onnur serlig viðurskifti

Fylgiskjal 5: Arbeiðsætlan og eftirlit viðvíkjandi serliga vandamiklum arbeiði

Fylgiskjal 6: Avmarkan av trygdartiltøkum á felagsøkjum

Fylgiskjal 7: Trygdareftirlit

Fylgiskjal 8: Trygdarfundir

Fylgiskjal 9: Mannagongd fyri alarm og tilbúgving

| Útgáva: | Dato: | Orða: | Viðmerkingar/góðkent |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| <1> | <dato> | <navn/initialir > | <Navn/Initialir> |

# 1 Alment um HTU-ætlanina

Í “*kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss*” hevur Landsstýrið fyrisett, at reglurnar í "*Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø*", vera galdandi. Í kunngerðini stendur m.a.:

§ 6. *Inden en byggeplads etableres, skal der foreligge en skriftlig plan for sikkerhed og sundhed i forbindelse med dens indretning og drift, jf. § 8, hvis*

*1) 2 eller flere arbejdsgivere samtidig beskæftiger flere end 10 personer på byggepladsen, eller hvis dette ikke er tilfælde,*
*2) byggepladsen skal anmeldes efter § 10, eller*
*3) bygge- og anlægsarbejdet indebærer særlige farer, som angivet i bilag 1. Hvis et bygge- og anlægsarbejde kun for en del består i arbejde af denne karakter, skal plan kun udarbejdes for den del af byggepladsen og den tidsperiode, inden for hvilken dette arbejde skal foregå.*

*§ 10. En byggeplads skal anmeldes til den stedlige arbejdstilsynskreds, inden arbejdet påbgyndes, hvis*

*1) arbejdets forventede varighed overstiger 30 arbejdsdage og mindst 20 ansatte er beskæftiget samtidigt, eller*
*2) den formodede arbejdsmængde overstiger 500 manddage.*

*§ 8. Planen for sikkerhed og sundhed skal udarbejdes under hensyn til projektets angivelser og forholdene på arbejdsstedet*

Plan for sikkerhed og sundhed (PSS) verður her rópt ætlan fyri heilsu, trygd og umhvørvi (HTU-ætlan)

Ætlanin fyri heilsu, trygd og umhvørvi (stytt HTU ætlan) er galdandi fyri ráðlegging og samskipan av heilsu-, trygdar- og umhvørvisarbeiðinum og tekur hon støði í:

- Galdandi lóggávu innan arbeiðsumhvørvi
- Politikki hjá Landsverki innan heilsu, trygd og umhvørvi
- Útbjóðingartilfari

Hon lýsir, hvørjar fortreytir eru galdandi fyri at skapa karmar fyri einum heilsugóðum, tryggum og umhvørvisvinarligum arbeiðsplássi. Ætlanin skal tryggja, at øll á byggiplássinum hava somu leiðreglur at ganga eftir, og at tær einstøku uppgávurnar og ábyrgdirnar eru kendar av øllum, sum hava tilknýti til verkætlanina.

HTU-ætlanin vísir eisini á serstakar reglur í sambandi við serliga vandamikið arbeiði, sum av trygdarávum skulu haldast av øllum á byggiplássinum. Hetta merkir somuleiðis, at ætlanin skal verða tøk hjá øllum á byggiplássinum.

HTU-ætlanin verður dagførd eftir tørvi, og verður hetta fráboðað viðkomandi pørtum. Víst verður eisini til galdandi lóggávu og handbókina "Arbejdsmiljø i bygge og anlæg", sum skal liggja tøk hjá arbeiðsfólkunum, t.d. í arbeiðsskúrinum á byggiplássinum.

Byggiharri setur HTU-samskipara (trygdarsamskipara) til verkætlanina. HTU-samskiparin hevur ábyrgdina av HTU-ætlanini og skal tryggja, at HTU-ætlanin og veruligu umstøðurnar støðugt eru í tráð við hvørja aðra. Eisini skal HTU-samskiparin samskipa og lýsa markamót millum partarnar viðvíkjandi heilsu, trygd og umhvørvisviðurskiftum á arbeiðsplássinum og á arbeiðsøkjunum. Fyri smærri verkætlanir er vanligt, at ábyrgdin sum HTU-samskipari er hjá verkætlanarleiðara hjá byggiharra. Byggiharri kann eisini lata uppgávuna víðari til byggileiðara.

Høvuðsarbeiðtakari hevur skyldu og ábyrgd av at koma við nøktandi tilfari og/ella upplýsingum til HTU-ætlanina undir útinning. Hetta er galdandi bæði fyri egið arbeiði og fyri undirarbeiðstakarar og útvegarar. Arbeiðstakarin hevur skyldu til støðugt at dagføra sín part av HTU-ætlanini og at lata broytingarnar til HTU-samskiparan hjá byggiharra.

Allir arbeiðstakarar herundir eisini undirarbeiðstakarar o.fl. hava ábyrgd av, at arbeiðsfólkið á staðnum eru vegleidd í mun til innihaldið í HTU-ætlanini, og at tey vita, hvar ætlanin finst. Hvør einstakur arbeiðstakari skal vegleiða síni starvsfólk í mun til tær avtalur, sum eru galdandi fyri samstarvið við hini virkini á byggiplássinum.

Frágreiðingar frá trygdarfundum eru partar av HTU-ætlanini.

HTU- ætlanin skal verða tøk og góðkend og skal tillagast undir allari byggitíðini.

Byrjað verður uppá HTU-ætlanina, tá ið skipanaruppskotið verður gjørt, og ætlanin skal verða tøk, tá ið høvuðsprojektið er góðkent. HTU-ætlanin skal verða góðkend, áðrenn byggiplássið verður innrættað.

Á smærri arbeiðsplássum, har bert ein arbeiðsgevari er, ella í mesta lagi 10 fólk verða á arbeiðsplássinum í senn, verður HTU-ætlan ikki kravd. Byggiharrin skal kortini síggja til, at arbeiðsumhvørvið er í lagi, men hvør einstakur arbeiðstakari hevur ábyrgdina av, at hetta verður hildið. Um so er, at arbeiði kemur undir serliga vandamikið arbeiðið, skal serlig arbeiðsætlan gerast fyri tað arbeiðið.

Ráðgevi tryggjar við sínum ávísingum, at reglurnar í arbeiðsumhvørvislóggávuni kunnu haldast alla livitíðina, líka frá útinning til og við rakstur og viðlíkahald.

Ráðgevi tilskilar, hvussu tey einstøku arbeiðini ella arbeiðsfasurnar kunnu best leggjast til rættis í mun til hvørja aðra, soleiðis at arbeiði kann ganga fyri seg vandaleyst heilsu og trygdarliga. Við støði í hesum tilskilar ráðgevi, hvussu nógv tíð eigur at verða sett av til fremjan av tí einkulta arbeiðinum ella arbeiðfasuni. Ráðgevi upplýsir serligar arbeiðsumhvørvis- og umhvørvisvandar og um vandamikil arbeiðir í sambandi við fremjing av verkætlanini. Rágevi ger uppskot til tekning yvir byggiplássið.

# 2 Um verkætlanina

Lýsing av verkætlanini í sambandi við útboð.

Stutt frágreiðing um verkætlanina. Hvat verður bygt, og nær verkætlanin verður liðug. Endamál við verkætlanini, arbeiðstøkur, útbjóðingarháttur, staðseting og hvørjar fasur eru í byggitíðini o.s.fr.

## 2.1 Arbeiðsumhvørvispolitikkur hjá byggiharra.

Landsverk vil, at ongin fær skaða ella mein av virkseminum á Landsverki, og at Landsverk dálkar umhvørvið minst møguliga. Vit leggja áherðslu á, at allar uppgávur, sum Landsverk loysir, skulu hava heilsu, trygd og umhvørvi við sum fokusøki.

Øll á Landsverki, og øll sum arbeiða hjá og fyri Landsverk skulu gera sítt til og luttaka í arbeiðinum innan heilsu, trygd og umhvørvi.

# 3 Bygnaður

Her skal standa stutt um bygnaðin

Áðrenn byggingin byrjar, skal upplýsast navn á virki og hvørjir persónar frá teimum eru á arbeiðsstaðnum, somuleiðis skal upplýsast arbeiðsleiðaraumboð og trygdarumboð á staðnum.

## 3.1 Aktørar og áhugabólkar

Skriva her, hvørjar arbeiðstøkur eru í hesi verkætlan. Navn og kontaktupplýsingar og hvørjir áhugabólkar eru.

## 3.2 Trygdarskipanin

Upplýsingarnir um, hvør er í trygdarskipanini, skulu latast HTU-samskiparanum á verkætlanini. Yvirlitið yvir trygdarskipanina sæst í fylgiskjali 1.

Sambært §35, stk 2 í kunngerð nr. 126 frá 4. september 1995 um trygdararbeiði á virkjum og arbeiðsplássum stendur "*Í arbeiði, sum er umfatað av hesum kapitli ella í arbeiði umfatað av hesum kapitli og kapittul 8, skal arbeiðið um trygd og heilsu skipast, tá tað á sama arbeiðsplássi starvast 5 ella fleiri persónar*".

Limir í trygdarskipanini skulu í minsta lagi hava tikið lógarbundna trygdarskeiðið. Sí kunngerð nr. 127 frá 4. september 1995 um trygdarskeið.

## 3.3 HTU-samskipari hjá byggiharra

Í hesi verkætlanini er <navn > HTU-samskipari.

Fyri at styrkja arbeiðsumhvørvispartin í felagsøkjunum skal byggiharrin tryggja, at ein samskipari verður tilnevndur, ið skal taka sær av at samskipa heilsu-, trygdar- og umhvørvisarbeiðið. Samskiparin kann vera í starvi hjá einum av arbeiðstakarunum, men skal virka vegna byggiharran.

Er HTU-samskiparin ikki tann sami í prosjekteringarfasuni sum í byggifasuni, skal tað tilskilast her. Um HTU-samskiparin eisini er t.d.verkætlarleiðari ella byggileiðari, skal hetta tilskilast í tekstinum.

HTU-samskiparin hevur ábyrgd av at skriva og dagføra HTU-ætlanina og at syrgja fyri, at hon er ein partur av grundarlagnum um samstarv innan heilsu, trygd og umhvørvi á byggi-plássinum. Arbeiðstakarar hava skyldu til at upplýsa og skriva HTU tilfar innan teirra øki og at lata HTU-samskiparanum tilfarið. Arbeiðstakarar hava ábyrgd av, at trygdarviðurskiftini er í lagi hjá teirra starvsfólkum.

Høvuðs arbeiðsuppgávurnar hjá HTU-samskiparanum eru at:

- Skriva, gera HTU-ætlanina lidna og dagføra hana
- Hava trygdarrundur
- Innkalla til trygdarfundir, skriva frásøgn og senda frásøgn til viðkomandi partar
- Fremja eftirlit við, at kravd trygdarútgerð verður brúkt
- Handhevja boð og vegleiðingar frá Arbeiðseftirlitinum
- Samskipa HTU á felagsøkjum

## 3.4 Fráboðan um byggiplássið

HTU-samskiparin hjá byggiharra fráboðar byggiplássið til Arbeiðseftirlitið, so skjótt sum høvuðsarbeiðstakari er settur.

Byggiplássið er fráboðað Arbeiðseftirlitinum hin <dato>

Avrit av fráboðan og svarinum frá Arbeiðseftirlitinum hongur <skriva staðseting>

Fráboðanin til Arbeiðseftirlitið finst á leinkinum niðanfyri:

http://www.arbeidseftirlit.fo/data/attachments/BEC5DB0C-D7F1-40D5-B970-AF59AE847F7C/9AB2BE65-2D79-4CF5-8240-F44AECF1B698.pdf

Byggiplássið skal fráboðast Arbeiðseftirlitinum, áðrenn arbeiði byrjar, um so er,

1) at longdin av arbeiðinum væntast at verða meir enn 30 arbeiðsdagar og minst 20 starvast samstundis á staðnum, ella
2) væntaða arbeiðsmongdin fer upp um 500 manndagar

## 4 Tíðarætlan og verandi viðurskifti

4.1 Tíðarætlan.

Ein dagførd tíðarætlan fyri verkætlanina skal altíð verða til taks og finst hon í fylgiskjali 2. Tíðarætlanin vísir m.a. tær einstøku arbeiðsfasurnar, og í hvørjum tíðarskeiðum serliga vandamikið arbeiði fer fram. Tíðarætlan skal hanga uppi á sjónligum staðið á byggiplássinum.

HTU-samskiparin hevur ábyrgdina av, at tíðarætlanin er dagførd og samskipar hana í samráð við ráðgevar, arbeiðstakarar og byggileiðslu.

### 4.1 Verandi viðurskifti

Í talvuni niðanfyri er yvirlit yvir verandi viðurskifti á byggiplássinum, har vandar eru, sum atlit skulu takast at í byggifasuni. Í talvuni niðanfyri eru dømir víst.

| Vandar | Frágreiðing, fyrivarni og trygdartiltak |
|---|---|
| Leiðingar í jørð | |
| Dálkingar. Olja, gift, onnur vandamikil evni v.m. | |
| Spreingivandi | |
| Tekniskar innleggingar, kloakkrør, vatnrør v.m. | |
| | |

## 5 Innrættan av byggiplássinum

### 5.1 Kunningartalvur

Kunningartalva við øllum viðkomandi upplýsingum til fólkið, sum arbeiðir á staðnum, er at finna < skriva, hvar kunningartalvan verður sett t.d. í matarhøllini> . Kunningartalvan verður dagførd av byggileiðsluni og inniheldur hon m.a. tekning av byggiplássinum, yvirlit yvir nær og hvar vandamikið arbeiði fer fram, viðkomandi telefonnummur og frágreiðingin frá trygdarrunduni.

### 5.2 Tekning yvir byggiplássið

Tekning yvir byggiplássið er at síggja í fylgiskjali 3. Tekningin av innrættanini av byggiplássinum er byrjað í prosjekteringarfasuni. Áðrenn byggingin fer fram, verður tekningin av byggiplássinum dagførd av HTU- samskiparanum. Tekningin verður endurskoða við atliti

at logistikki (rakstur og nýtsla) og arbeiðshátti á byggiplássinum. Arbeiðstakarar skulu í seinasta lagi 10 arbeiðsdagar, áðrenn arbeiði byrjar, koma við teirra ískoytum til liðugtgerð av byggiplásstekningini.

Tekning – flatmynd - av byggiplássinum hongur á upplagstalvuni, sum er <við inngongdina til byggiplássið>. Hetta soleiðis, at hon er sjónlig hjá øllum, sum koma á byggiplássið. Tekningin verður javnan dagførd av HTU-samskiparanum. Tí skulu øll, sum koma á byggiplássið, altíð kunna seg um tekningina.

## 6 Sera vandamikið arbeiðið og/ella aðrir serligir vandar

Í fylgiskjali 4 er yvirlit yvir, hvørji sera vandamikil arbeiðir eru í hesi verkætlan og í tíðarætlanini fylgiskjal 2 sæst, nær vandamikið arbeiði fer fram.

Arbeiðstakarar lýsa út í æsir arbeiðsætlanir fyri teirra arbeiðir. Har talan er um sera vandamikið arbeiði og/ella aðrir serligir vandar, verða hesi viðurskifti samskipaði á trygdarfundum.

Arbeiðstakarin lýsir skrivliga arbeiðshátt, og hvørji trygdaratlit verða tikin innan egin øki. Arbeiðsætlan yvir arbeiðshátt í sambandi við sera vandamikið arbeiði og/ella aðrir serligir vandar sæst í fylgiskjali 5.

Øki, har sera vandamikið arbeiði fer fram, og hvørji trygdaratlit skulu takast, síggjast í fylgiskjali 4 og 5.

Niðanfyri sæst yvirlit yvir, hvørji arbeiðir eru serliga vandamikil í hesari verkætlan, har serlig trygdaratlit skulu takast:

- < arbeiði við epoxy>
- < arbeiði við stórum undantilgjørdum elementum>
- < Spreingiarbeiði>
- <Arbeiði í trongum rúmi>

Sí fylgiskjal 1 í "bekendtgørelse nr. 1017 frá 15. desember 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø". Her er yvirlit yvir nøkur av teimum sera vandamiklu arbeiðunum, ein skal taka atlit at. Yvirlitið er ikki endaligt.

http://www.logir.fo/ViewLaw.aspx?id=13298

## 7 Trygdarviðurskifti á byggiplássinum

### 7.1 Almennar trygdarreglur á byggiplássinum

Á byggiplássinum er krav hjá øllum at brúka

- trygdarhjálm,
- trygdarfótbúnað
- Sjálvlýsandi og reflekterandi arbeiðsklæðir ella trygdarvest. Undantikið er, tá ið arbeiðið krevur aðra persónliga verndarútgerð.

Afturat hesum skulu aðrar persónligar verjur/verndarútgerð brúkast sambært galdandi lóggávu.

Á byggiplássinum er somuleiðis galdandi at:

- Øll, sum arbeiða ella koma á byggiplássið, skulu hava fingið kunning/leiðbeining viðvíkjandi grundleggjandi trygdarviðurskiftum og ásetingum á byggiplássinum.
- Vitjandi skulu fylgjast við einum, sum kennir byggiplássið, og sum kennir trygdarviðurskiftini og ásetingarnar á byggiplássinum.
- Vitjandi skulu verða í kravdu persónligu trygdarútgerðini.
- Tað er bannað at hava alkohol og rúsevnir á byggiplássinum. Fólk, sum eru ávirkaði, verða burturvíst.
- Parkering av privatum bilum er bert loyvi innan fyri avmarkaðu økini.
- Parkering av øðrum akførum skal ikki koma fyri á felags atkomuvegum, uttan so at byggileiðslan frammanundan hevur givið loyvi til tess.
- Tað er ikki loyvt at kasta sær av vatninum aðrastaðnis enn í tilhoyrandi vesum.
- Arbeiðstakarar í økinum skulu taka fyrilit fyri trygdini hjá íbúgvum og virkjum í nærumhvørvinum.

## 7.2 Trygdartiltøk á felagsøkjum

Ábyrgdin hjá arbeiðstakarum í sambandi við arbeiðsumhvørvisviðurskifti á felagsøkjunum finst í fylgiskjali 6. Fylgiskjali verður dagført javnan.

Tað er HTU-samskiparin sum ásetur, hvør hevur ábyrgd av at seta upp, viðlíkahalda og taka niður heilsu-, trygdar- og vælferðarskipanirnar.

Arbeiðstakarar hava skyldu til at seta upp, halda eyga við, viðlíkahalda og handhevja egin øki. Somuleiðis hava teir ábyrgd av at taka niður og beina burtur skipanir, tey tíðarskeið avtalað er á samskipandi trygdarfundum, hetta til frama fyri arbeiðsumhvørvið bæði hjá egnu arbeiðsfólkum og hjá undirarbeiðstakara á byggiplássinum.

Á trygdarfundum/byggifundum verður avtalað nærri, hvussu felagsøkini verða samskipað.

Byggiharrin ásetur markamót og samskipar tey tiltøk, ið skulu fremjast fyri trygd og heilsu hjá starvsfólkunum í felagsøkjunum. Eisini skal greitt staðfestast, hvør hevur ábyrgd av hvørjum øki/staði/virksemi.

## 7.3 Ruddiligt og vælskipað øki

Byggiplássið skal verða væl skipað og ruddiligt. Tryggjast skal, at hesi viðurskifti altíð eru arbeiðsumhvørvisliga ráðilig. Gangileið og rýmingarleið skal altíð verða ruddilig.

## 7.4 Óljóð

Arbeiði, sum viðførir nógvan gang, skal avmarkast so nógv sum til ber. Oyrnavernd skal verða tøk, tá óljóðið er á 80 dB (A). Oyrnavernd skal nýtast, tá óljóðið fer upp um 85 dB(A).

Arbeiðir, sum viðføra nógvan gang, skulu leggjast til rættis soleiðis, at so fá sum gjørligt hava ampa av hesum óljóði. Samskipan av hesum verður gjørd á trygdarfundum.

## 7.5 Dust

Arbeiðstakarar hava skyldu til at minka um dustmongdina í sambandi við arbeiðir. Hetta kann til dømis gerast við at fáa til vega beinleiðis dustsúgving á handamboði ella maskinu. Inni í bygningi, har nógv dust er, skal dustsúgvast og ikki sópast, tí tað fær dustið at fúka.

## 7.6 Koyrandi og gangandi ferðsla

Skilnaður skal verða millum koyrandi og gangandi ferðslu. Har tað ikki ber til, skulu reglur gerast um, hvussu ferðslan verður skipað.

## 7.7 Lastbilar og bakking

Fyri at fyribyrgja at óhapp henda, meðan bakkað verður, skulu lastbilar hava bakkiávaring. Um lastbilurin ikki hevur bakkiávaring, skulu fólk, sum eru nærhendis, varskógvast á annan hátt.

## 7.8 Krøv í sambandi við íhøgging (Krøking)

Tað henda nógv óhapp og persónsvanlukkur í sambandi við kranaarbeiði, spøl og íhøgging. Tí verður kravt, at øll, sum íhøgga, skulu hava neyðug loyvisbrøv ella verða væl upplærd til virksemið, og skal hetta prógvast fyri byggileiðsluni. Har lyftiarbeiði framgongur í yvirlitinum yvir serliga vandamikið arbeiði, skal mannagongdin góðkennast av byggileiðsluni.

## 7.9 Maskinur og útgerð

Maskinur og útgerð skulu bert brúkast til tað arbeiðið, tær eru ætlaðar til. Maskinur og útgerð skulu haldast viðlíka sambært brúkaravegleiðingini frá veitara. Arbeiðstakarin kemur við upplýsingum og váttanum hesum viðvíkjandi.

## 7.10 Dátubløð

Dátubløð fyri kemisk evni skulu setast í ringbind serstakt til hetta endamálið. Ringbindið skal standa á <skrivstovuni á byggi-og anleggsplássinum> og verða atkomuligt hjá øllum arbeiðstakarunum á plássinum <til dømis á matarhølinum, verksmiðjuni...>. Staðsetingin skal verða løtt at finna, soleiðis at dátublaðið kann takast við til læknan, um so er, at persónsóhapp hendir av hesum slagi.

## 8 Eftirlit

Allir arbeiðstakarar skulu føra eftirlit við egnum trygdarviðurskiftum og teimum felags trygdarviðurskiftum, sum teir hava ábyrgd av smb. fylgiskjali 6.

Skipað uppfylging av arbeiðsumhvørvisviðurskiftunum á byggiplássinum verður gjørt við hjálp av eftirlitsskemaðinum, trygdarfundum og byggifundum.

Arbeiðstakarar hava skyldu at luttaka í trygdarrunduni og at bøta um manglandi/avtalaðu trygdartiltøk.

Frágreiðingin frá trygdarfundunum skal hangast upp á einum sjónligum staði á byggiplássinum.

Niðanfyri er yvirlit yvir títtleikan av eftirlitinum av arbeiðsumhvørvinum á staðnum:

| Tittleiki av eftirliti | Mannagongd | Hvør |
|---|---|---|
| Dagliga | Hava eftirlit við trygdini á egnum arbeiðsøkjum og atkomuvegum, herundir at økið er ruddiligt. Møguligir manglar verða avgreiddir. Álvarslig brek verða fráboðað HTU-samskiparanum | Allir arbeiðstakarar |
| 14. hvønn dag | Trygdarrunda og fundur | HTU-samskipari saman við arbeiðsleiðara og trygdar-umboðum á staðnum. |
| Mánaðarliga | Eftirlit við trygdarviðurskiftunum á persónslyftum, arbeiðspallum og byggipallum o.l. | Tann, sum hevur sett upp |
| Hvønn ársfjórðing | Fyribils el-innleggingar | El-arbeiðstakari |

### 8.1 Trygdarrunda

HTU-samskiparin gjøgnumgongur byggiplássið arbeiðsumhvørvisliga 14. hvønn dag.

Tey, sum skulu luttaka í eftirlit, eru:

- Minst eitt umboð fyri hvønn arbeiðstakara, sum verður á staðum komandi tíðarskeið. Umboðið eigur at vera í trygdarbólkinum.
- Um neyðugt, innkallar HTU-samskiparin serlig umboð fyri ein einstakan arbeiðstakara.

Eftirlitið kann t.d. fylgja leistinum “mønsterarbeidsplads”. Eftirlitsblaðið er at finna í fylgiskjali 7.

Eftir trygdarrunduna verða eygleiðingar settar í trygarrunduskemaði. Viðurskifti frá trygdarrunduni verða gjøgnumgingin á trygdarfundunum (fylgiskjal 8). Fundarfrágreiðing og viðurskifti frá trygdarrunduni verða hongd upp á felagsuppslagstalvuna á byggiplássinum.

## 8.2 Trygdarfundir

HTU-samskiparin innkallar til trygdarfund í sambandi við samskipan av arbeiðsumhvørvinum og umhvørvinum.

Trygdarfundir eru í minsta lagi 14. hvønn dag. Tá ið óhapp og/ella serligar umstøður gera seg galdandi, verður innkallað til eyka trygdarfund. Allir arbeiðgevarar (entreprenørar, undirentreprenørar, leverandørar o.fl.) sum hava virksemi á byggiplássinum i komandi tíðarskeiðinum, skulu luttaka við arbeiðsleiðara og trygdarumboði. Í teimum førum har einki trygdarumboð er lógarkravt, skal arbeiðsleiðarin luttaka.

Fundarluttakararnir skulu hava heimild og førleika til at gera bindandi avtalur innan trygdararbeiði á byggiplássinum.

Hjá arbeiðstakara við fleiri enn 10 arbeiðsfólkum verður trygdarfundur hildin fyri seg. Har færri enn 11 arbeiðsfólk eru frá arbeiðstakara, verður fundurin hildin saman við byggifundinum.

Hjá arbeiðstakarum við færri enn 5 arbeiðsfólkum á staðnum skal arbeiðsleiðarin luttaka. Fyri arbeiðstakarar, har 5 ella fleiri arbeiðsfólk eru á byggiplássinum, skulu bæði arbeiðsleiðari og trygdarumboð luttaka.

HTU-samskiparin skrivar fundarfrásøgn frá hvørjum trygdarfundi, sí fylgiskjal 8. Fundarfrásøgnin skal sendast til fundarluttakarar, byggiharra og arbeiðstakarar. Arbeiðstakarar og undirarbeiðstakarar hava ábyrgd av at geva øllum frágreiðingina innan egið virki, herundir til síni egnu starvsfólk.

# 9 Tilbúgving

## 9.1 Ávaringarskipan í sambandi við persónsvanlukku/óhapp

Tilbúgving í sambandi við arbeiðsóhapp, eld v.m. er at finna í fylgiskjali 9. Yvirlitið skal hangast upp á sjónligum staði og gjøgnumgangast við arbeiðsfólkið. Arbeiðsfólkið hevur skyldu til at fylgja leiðbeiningini.

## 9.2 Fráboðan av vanlukku/óhappi

Um so er, at onkur skuldi komið til skaða, ella um onnur óhapp henda, skal viðkomandi arbeiðstakari umgangandi og innan 24 tímar seta seg í samband við HTU-samskiparan. Um HTU-samskiparin ikki er tøkur, skal byggileiðslan kontaktast. Arbeiðstakarin hevur skyldu til at fráboða øll persónsóhapp til Arbeiðseftirlitið, sum hava við sær ein fráverudag útyvir skaðadagin. Arbeiðstakarin skal síðani eftirkanna, hví óhappið hendi og gera ábøtur, soleiðis at slík óhapp ikki henda aftur.

## 10 Vegleiðing og upplæring

Arbeiðstakarin skal kunna skjalprógva, at neyðug leiðbeining og upplæring av arbeiðsfólkunum viðvíkjandi t.d. brúki av tekniskum hjálpartólum, serliga vandamiklum ella óvanligum arbeiðsuppgávum, arbeiði við evnum og tilfari, epoxyarbeiði o.a. Arbeiðstakarin skal hava yvirlit yvir kvalifikatiónir hjá arbeiðsfólkunum og útbúgving, herundir t.d. kranførara prógv, trukk prógv, og trygdarútbúgving. Skjalprógv og yvirlit skal latast byggileiðsluni (HTU-samskiparanum).

HTU-samskiparin heldur trygdarleiðbeining fyri øllum, sum skulu hava atgongd til byggiplássið.

## 11 Revsiatgerðir

HTU-samskiparin hevur loyvi til at geva boð og átalur til arbeiðsfólk, sum ikki halda galdandi lógir, reglur ella arbeiðsumhvørvisfyriskipanir. HTU-samskiparin kann, alt eftir hvørjar umstøður talan er um, brúka hesar revsiatgerðir:

- Geva munnliga ávaring
- Geva skrivliga ávaring
- Steðga arbeiðinum
- Fáa trygdarfyriskipanir framdar fyri rokning hjá arbeiðstakara
- Burturvísa viðkomandi arbeiðsfólk frá byggiplássinum

Fylgiskjal 1 – Bygnaður

Trygdarumboð og arbeiðsleiðaraumboð skulu í minsta lagi hava lógarbundna trygdarskeiðið.

Set frámerki við tey, sum hava skeiðið.

| | Virki | Kontaktpersónur | Telefon | Teldupostur | Trygdarskeið |
|---|---|---|---|---|---|
| Byggiharri | **Landsverk** | | | | |
| | Verkætlanarleiðari | | | | |
| | Byggileiðari | | | | |
| | HTU-samskipari | | | | |
| Arbeiðstakari | <navn> | | | | |
| | Arbeiðsleiðari | | | | |
| | Trygdarumboð | | | | |
| Arbeiðstakari | <navn> | | | | |
| | Arbeiðsleiðari | | | | |
| | Trygdarumboð | | | | |
| Arbeiðstakari | <navn> | | | | |
| | Arbeiðsleiðari | | | | |
| | Trygdarumboð | | | | |
| Arbeiðstakari | <navn> | | | | |
| | Arbeiðsleiðari | | | | |
| | Trygdarumboð | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| Arbeiðseftirlitið | | | 556400 | arb@arb.fo | |
| | | | | | |

# Fylgiskjal 2 - Tíðarætlan

Her finst nágreinilig tíðarætlan, sum greitt er frá undir parti 4. Í tíðarætlanini skal eisini upplýsast, nær sera vandamikið arbeiði fer fram. Hvørji hesi arbeiði eru, er lýst undir pkt. 6.

Tíðarætlanin skal í minsta lagi innihalda:

- Nær, hvør einstakur arbeiðstakari hevur arbeiðsuppgávur í arbeiðsumráðnum, og hvussu nógv tíð er sett av til hvørt arbeiðið.
- Hvørji tíðarskeið, har serliga vandamikið arbeiði fer fram og/ella arbeiði, har serligir vandar eru.
- Nær, hvør einstakur arbeiðsgevari kann koma við tilfari og tekniskum hjálpartólum, seta skúrar og líknandi upp, seta frá sær burturkast, binda í útbúna til el, vatn, kloakk v.m. , nýtslu av flutnings- og atkomuvegum, byggipallum og øðrum felags fyriskipanum.
- Hvussu nógv fólk eru á hvørjari uppgávu.

Fylgiskjal 3 – Tekning av byggiplássinum

Dagførda tekningin av byggiplássinum finst her.

Byggiplásstekningin skal innihalda:

- Felags umstøður, íbindingarstað, eitt nú vatn, kloakk og el.
- Staðseting av byggiplássskúrum
- Staðseting av verkstaði, bingjum o.l. til føst arbeiðspláss til eitt nú jarnibinding og sagiborð
- Øki til goymslu av tilfari fyri teir ymisku bólkarnar
- Staðseting av burturkastbingjum
- Atkomu- og flutningsvegir og rýmingarleiðir
- Skilnað millum gangandi og koyrandi ferðslu
- Váða økir, har vandar eru, sum krevja serligt eftiransni (serliga vandamikið arbeiði og arbeiði við serligum trygdarkrøvum)
- Staðseting av kranum, byggipallum og aðari tekniskari útgerð
- Ávísing, hvar møgulig moldgoymsla er.
- Staðseting av eld-, bjargingar- og fyrstahjálpsútgerð, telefon
- Samskiftisupplýsingar um lyklafólk
- Kunningarljós, ljósmastur

Harumframt er á hvørjari hædd ein flatmynd, sum m.a. vísir rýmingarleiðir, og hvar útgerð til fyrstuhjálp er.

Fylgiskjal 4– Sera vandamikið arbeiði og aðrir serligir vandar

Yvirlit yvir serligar vandar og onnur serlig viðurskifti.

Støða verður tikin til hvønn teig, um hesi viðurskifti eru viðkomandi fyri hesa verkætlanina. Hetta verður gjørt í samband við innleiðandi fundin.

Í teigin avleiðing/átak verður avleiðingin/átakið lýst nærri.  Viðmerk tey øki, sum eru viðkomandi. Listin er ikki endaligur, og fleiri vandamikil arbeiðir kunnu skoytast uppí.

Nærri lýsing av vandum, og hvørji trygdaratlit verða tikin, verða lýst nærri í fylgiskjali 5. Tað er arbeiðstakarin, sum kemur við hesum upplýsingunum.

Fylgiskjal 1 í bekendtgørelse nr. 1017 frá 15. desember 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø. Sí *

## Yvirlit sera vandamikið arbeiði og aðrir serligir vandar

| Sera vandamikið arbeiði | Avleiðing /átak |
|---|---|
| *Arbeiði har serligur vandi er fyri at verða jarðaður, at søkka ella detta oman/niður orsakað av slagi av aktiviteti ella nýttari arbeiðstilgongd ella orsakað av umhvørvinum á arbeiðsplássinum ella kringumstøðum uttan um bygingina. | |
| *Arbeiði, sum útsetir arbeiðstakaran fyri kemiskum ella biologiskum evnum og tilfari, sum antin kann føra við sær vanda fyri heilsu og trygd hjá arbeiðstakara ella fevnir um lógarkrav um heilsueftirlit (t.d.epoxy ella asbest). | |
| *Arbeiði, har vandi er fyri ioniserandi stráling (geislavirkni) | |
| *Arbeiði nær við háspenningslinjur ella elektriskum innleggingum | |
| *Arbeiði, har vandi er fyri at drukna | |
| *Arbeiði í brunnum, tunlum ella undir jørð | |
| Arbeiði í søkkkassa, har luftin er samantrýst | |
| *Arbeiði undir vatni, har kavaraútgerð krevst | |
| *Arbeiði í trýstkamari | |
| *Arbeiði, sum inniber nýtslu av spreingievnum | |
| *Uppseting og niðurtøka av tungum undantilvirkaðum lutum (elementum) | |
| Onnur serlig viðurskifti | |
| Arbeiði í trongum rúmum, ella har plássviðurskiftini eru sera trong annars. | |
| Arbeiði í rúmum ella støðum, har atkomuviðurskiftini eru serliga vánalig. | |
| Arbeiði undir viðurskiftum, sum kunnu viðføra, at ein er serliga nógv útsettur fyri dusti, gassi, óljóði ella ristingum | |
| Arbeiði undir serliga skitligum viðurskiftum | |

Fylgiskjal 5.  Arbeiðsætlan og eftirlit viðvíkjandi serliga vandamiklum arbeiði.

Arbeiðsætlan og títtleiki av eftirliti við serliga vandamiklum arbeiði og vandamiklar umstøður. Her verður nærri greinað, hvørjir vandar eru við tí einstaka arbeiðinum, sum eru serliga vandamiklir, hvørji trygdaratlit skulu takast og eftirlit við virkseminum.

Hjálagda skjal kann brúkast sum leistur.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Lýsing av arbeiðinum/arbeiðsuppgávuni: | | | | |
| | | | | |
| Lýsing av vandum (heilsu, trygd og umhvørvi), sum skulu avmarkast/beinast burtur: | | | | |
| | | | | |
| Serstøk fyribyrgjandi tiltøk til avmarkan/burturbeining av vandum: | | | | |
| | Hvat | Ábyrgd | Mannagongd eftirlit | Títtleiki av eftirliti |
| Persónligar verjur | | | | |
| Teknisk hjálpitól | | | | |
| Aðrar fyriskipanir | | | | |
| Møgulig krøv til útbúgving: | | | | |
| | | | | |
| Lýsing av nágreiniligari leiðbeining: | | | | |
| | | | | |

Fylgiskjal 6 – Avmarkan av trygdartiltøkum á felagsøkjum

Eftirkanningarlisti við møguleika at tillaga til arbeiðstøkuna

Tann prosjekterandi fyriheldur seg til punktini niðanfyri og leggur afturat punkt ella tekur burtur óneyðug punkt. HTU samskiparin dagførir leypandi.

| | Evni | Ábyrgd | | | | | Uppgáva | | | Tíðarskeið | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Byggiharri | Arbeiðstakari | Arbeiðstakari | Arbeiðstakari | Arbeiðstakari | Fáa til vega | Viðlíkahald | Niðurtøka | Frá | Til |
| | **Alment** | | | | | | | | | | |
| 1 | Skriva HTU ætlanina | | | | | | | | | | |
| 2 | Fráboðan av byggiplássið til Arbeiðseftirlitið | | | | | | | | | | |
| 3 | Dagføra HTU ætlanina | | | | | | | | | | |
| 4 | Leiðreglur fyri byrjan av arbeiðum, sum krevja serlig fyrilit til arbeiðsumhvørvið, herundir "serliga vandamikið arbeiði" | | | | | | | | | | |
| 5 | Kunna starvsfólk um innihaldið í HTU ætlanini og um viðkomandi ferðsluviðurskifti. | | | | | | | | | | |
| 6 | Hanga upp galdandi tekning yvir arbeiðsøkið á eitt sjónligt stað | | | | | | | | | | |
| 7 | Samskipa arbeiðsumhvørvisarbeiðið á felagsøkjum á byggi plássinum | | | | | | | | | | |
| 8 | Hava trygdarrundur, áðrenn hvønn trygdarfund | | | | | | | | | | |
| A | **Innleggingar í byggiplássið:** | | | | | | | | | | |
| 1 | El-tavlur og veitan, trygging móti veðri og tjóvarí. | | | | | | | | | | |
| 2 | Tryggja káplar til høvuðs- og undirtalvur (niðurgrava, rørføring, hongd uppi ella líkn.) | | | | | | | | | | |
| 3 | Eftirlit av innleggingum á byggiplássinum 3. hvønn mánaða | | | | | | | | | | |
| 4 | Vatn frá byggingini | | | | | | | | | | |
| 5 | Vatnveiting til byggiplássskúrar | | | | | | | | | | |
| 6 | Frosttrygging av vatnveiting | | | | | | | | | | |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | Frárenning frá byggipláss skúrum | | | | | | | | | | |
| 8 | Neyðtelefon | | | | | | | | | | |
| 9 | Ljós uttandura, Kunningarljós | | | | | | | | | | |
| 10 | Ljós innandura, Kunningarljós | | | | | | | | | | |
| B | **Ferðsluøki uttandura:** | | | | | | | | | | |
| 1 | Felagsvegir á byggiplássinum (koyrandi) | | | | | | | | | | |
| 2 | Felagsvegir á byggiplássinum (gangandi) | | | | | | | | | | |
| 3 | Verja millum koyrandi og gangandi ferðslu | | | | | | | | | | |
| 4 | Trappur og gangibrýr | | | | | | | | | | |
| 5 | Reinhald av ferðsluøkjum, kavarudding og salting | | | | | | | | | | |
| 6 | Forðan fyri dusti á koyrivegum | | | | | | | | | | |
| 7 | Innrættan av goymsluplássi til tilfar | | | | | | | | | | |
| 8 | Reinhald av goymsluplássum, kavarudding og salting | | | | | | | | | | |
| 9 | Reinhald av koyrivegum millum almennan veg og byggipláss, kavarudding og salting | | | | | | | | | | |
| 10 | Hegna inni byggipláss | | | | | | | | | | |
| 11 | Parkering | | | | | | | | | | |
| 12 | Reinhald av parkeringarøkjum, kavarudding, salting og sandgrús. | | | | | | | | | | |
| C | **Ferðsluøki innandura:** | | | | | | | | | | |
| 1 | Fyribilstrappur og –stigar | | | | | | | | | | |
| 2 | Reinhald av ferðsluøkjum | | | | | | | | | | |
| 3 | Dustsúgva ferðsluøki | | | | | | | | | | |
| 4 | Breiða (tilhylja) á gólv | | | | | | | | | | |
| 5 | Breiða á varandi trappur | | | | | | | | | | |
| 6 | Forðan fyri støvi við luftreinsarum | | | | | | | | | | |
| D | **Skúrar  og lagurstað:** | | | | | | | | | | |
| 1 | Staðseta skúrar. Fáa til vega skúrar | | | | | | | | | | |
| 2 | Trappur og trappupallar til skúrar | | | | | | | | | | |
| 3 | Skrivstovuskúrur til byggiharra og byggileiðslu | | | | | | | | | | |

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Fundarskúrur til byggileiðsluna | | | | | | | | | | | |
| 5 | Manningarskúrar við bað og wc | | | | | | | | | | | |
| 6 | Reingerð í skúrum | | | | | | | | | | | |
| 7 | Skipa fyri burturkastbingjum | | | | | | | | | | | |
| 8 | Útgerð til fyrstuhjálp | | | | | | | | | | | |
| 9 | Eldsløkkiútbúnaður | | | | | | | | | | | |
| 10 | Bingjur til tilbúgving | | | | | | | | | | | |
| 11 | Skilja burturkast | | | | | | | | | | | |
| 12 | Tøma burturkastbingjur | | | | | | | | | | | |
| 13 | Bingja til útbúnað og amboð | | | | | | | | | | | |
| 14 | Teltverkstaður/smiðja | | | | | | | | | | | |
| E | **Skelting** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Skelting á byggiplássinum | | | | | | | | | | | |
| 2 | Ferðsluskelti | | | | | | | | | | | |
| 3 | Ávaringar- og boðskelti | | | | | | | | | | | |
| 4 | Skelting rýmingarleið | | | | | | | | | | | |
| 5 | Umsjón komu/fara | | | | | | | | | | | |
| 6 | Sýnisskáp til kunning | | | | | | | | | | | |
| F | **Arbeiðsøki:** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Dekka til hol í dekki/gólvi | | | | | | | | | | | |
| 2 | Dekka til hol í veggum | | | | | | | | | | | |
| 3 | Rimagirðing (hand-, knæ- og fótlisti) við allar kantar, sum eru hægri uppi enn 2 m yvir jørðildi | | | | | | | | | | | |
| 4 | Rimagirðing við onnur op, har váði er. | | | | | | | | | | | |
| 5 | Ljósbúnaður í felags arbeiðsøkjum | | | | | | | | | | | |
| 6 | Trygging móti vandum frá verandi kringumstøðum (háspenning, ferðslu, dálking…) | | | | | | | | | | | |
| 7 | Fyribilsafturlating av ráhúsið | | | | | | | | | | | |
| 8 | Skelting og stongsil við brúki av bóltapistól | | | | | | | | | | | |
| 9 | Upphiting av arbeiðsøkjum | | | | | | | | | | | |
| G | **Útgrevstur og leiðingar í jørð** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Tryggja standfesti við útgravingum | | | | | | | | | | | |
| 2 | Tryggja móti omanlopi í | | | | | | | | | | | |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | útgrevstrum | | | | | | | | | | |
| 3 | Atkomu– og rýmingarleiðir frá byggigrøv | | | | | | | | | | |
| 4 | Dekka til uppgravaða mold | | | | | | | | | | |
| 5 | Turrhalda útgravingar og byggigravir | | | | | | | | | | |
| H | **Teknisk hjálpartól (felags) og dátubløð** | | | | | | | | | | |
| 1 | Krani | | | | | | | | | | |
| 2 | Lyfta til tilfar | | | | | | | | | | |
| 3 | Lyfta til persónar | | | | | | | | | | |
| 4 | Byggipallur | | | | | | | | | | |
| 5 | Vetrarinndekningur av byggipalli | | | | | | | | | | |
| 6 | Dátubløð | | | | | | | | | | |
| I | **Annað:** | | | | | | | | | | |
| 1 | Skiftast um at fremja trygdareftirlit | | | | | | | | | | |
| 2 | Luttøku í tilbúgvingar venjingum | | | | | | | | | | |
| 3 | Luttøku í kravdari kunning um byggiplássið | | | | | | | | | | |

*Sí §55 eisini í kunngerð nr. 126 frá 4. september 1995 um trygdararbeiði á virkjum og arbeiðsplássum.*

LANDSVERK
byggir land

Fylgiskjal 7: Eftirlitsskema at brúka í sambandi við byggiverkætlanir.

Eftirlitsblaðið skal brúkast í sambandi við trygdareftirlit á byggiplássinum. Trygdareftirlitsrunda er 14. hvønn dag, og tá munandi broytingar henda. Eftirlitið verður framt av HTU-samskipara, ella tí, sum hevur fingið ábyrgdina av eftirlitinum frá byggiharra. Á eftirlitinum skulu umframt trygdarleiðari fyri byggiplássið verða trygdarumboð og arbeiðsleiðaraumboð.

Eftirlitsblaðið skal tillagast virkseminum á byggiplássinum, við tað at summi punkt detta út, meðan onnur leggjast afturat.

Eftir trygdareftirlitið skal verða trygdarfundur. Trygdarfundur verður hildin sama dag ella dagin eftir, at trygdareftirlitið er framt. Trygd skal verða eitt fast punkt á øllum byggiplássfundum. Oyðublað til fundarfrásøgn til trygarfund finst niðanfyri.

# Eftirlitsskema

## Byggipláss: ______________________________

| Vika: | Dagur: XX.XX.2015 | Teknfrágreiðing til viðkomandi arbeiði | |
|---|---|---|---|
| | | | Nøktandi. Samsvar er við krøvini til hetta arbeiðið. |
| Eftirlit: Nr. | | | Ikki nøktandi. Ósamsvar er við krøvini til hetta arbeiðið. |
| | | | Als ikki nøktandi. Vandi er á ferð. Tiltøk skulu gerast beinanvegin. |

| Luttikið á eftirlitinum: | |
|---|---|

| Evni | Støða | | | Viðmerkingar<br>Myndir kunnu eisini setast inn her | Ábyrgd-<br>Avgreiðast innan |
|---|---|---|---|---|---|
| Skelting | | | | | |
| Girðingar um arbeiðsstaðið | | | | | |
| Atkomuvegir og rýmingarleiðir | | | | | |
| Ruddiligt og skil á økinum – uttandura/innandura | | | | | |
| Burturkastviðurskifti | | | | | |
| Byggipláss – útgerð | | | | | |
| Vælferðarfyriskipan (Skúrar, reinføri) | | | | | |
| Goymsluøki (pláss, rudding, trygging) | | | | | |
| Kunningarljós (min . 25 lux) og arbeiðsljós | | | | | |
| Kaðalar, leiðingar og talvur | | | | | |
| Útgerð til eldsløkking og 1. hjálp | | | | | |
| Girðing, avbyrging og útyvirbreiðing | | | | | |
| Byggipallar, stigar og lyftir | | | | | |
| | | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Inndekningar – spuns v.m. har útgrevsturin er djúpur | | | | | |
| Ferðslutrygd | | | | | |
| Byggikranar og krókar (íhøggingarútgerð) | | | | | |
| Amboð (sagir, maskinur v.m.) Tøknilig hjálpitól | | | | | |
| Verndarútgerð (hjálmur, oyrnavernd, støvmaska, eygnavernd v.m.) | | | | | |
| Støvminkandi atgerðir | | | | | |
| Brúk av kemiskum evnum | | | | | |
| Annað | | | | | |
| Sertiltøk til arbeiðsgongdir við serliga vandmiklum arbeiði | | | | | |
| Fráboðanir og loyvir | | | | | |
| Seinasta útgáva av byggiplássætlan | | | | | |
| Fyriskipan av arbeiðinum | | | | | |
| Lógir, kunngerðir, reglugerðir, vegleiðingar | | | | | |

Fylgiskjal 8: Trygdarfundur- leistur at brúka í sambandi við byggiverkætlanir.

Eftir trygdareftirlitið skal verða trygdarfundur. Trygdarfundur verður hildin sama dag ella dagin eftir, at trygdareftirlitið er framt. Trygd skal verða eitt fast punkt á øllum byggiplássfundum. Oyðublað til fundarfrásøgn til trygdarfund finst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| Mál:<br><br>Dato:<br>Staður: | Fundarfrásøgn frá trygdarfundi<br><br>Dato: |
| Luttakarar: Navn arbeiðstakari Teldupostur | Ref.: Síða x/x |
| Avrit til: Fundarluttakarar<br>Og : - | |

| | | Atgerð/ábyrgd |
|---|---|---|
| 1. | Viðmerkingar frá/til seinastu frásøgn | |
| | | |
| 2. | Myndugleikar | |
| | | |
| 3. | HTU – Ætlan fyri heilsu, trygd og umhvørvi | |
| | | |
| 4. | Tíðarætlan, við atliti at trygdarsamskipanini | |
| | | |
| 5. | Trygdareftirlit | |
| | | |
| 6. | Arbeiðsóhapp, nærvið hendingar og vandamiklar umstøður | |
| | | |
| 7. | Manning | |
| | | |
| 8. | Ymiskt | |
| | | |
| 9. | Næsti fundur | |
| | | |

Fylgiskjal 9 – Mannagongd fyri ávaring og tilbúgving

Her skulu allir viðkomandi upplýsingar um ávaring og tilbúgving upplýsast, sí undir parti 10. tilbúgving fyri nærri frágeiðing.

- Hendingar innan tilbúgving
- Bygnaður
- Ábyrgd
- Mannagongd
- Trygdarútgerð/bjargingarútgerð
- Frágreiðing

Í projekteringini verður ein yvirskipað tilbúgvingarætlan fyri allar arbeiðsgevarar/arbeiðstakarar gjørd, og HTU samskiparin fyllir út teir upplýsingar, sum eru tøkir tá.

HTU samskiparin dagførir tilbúgvingarætlanina í byggi-/anlegsumfarinum.

Tilbúgvingarætlan fyri hvønn arbeiðstakara:

Tilbúgvingarætlanin er serstøk fyri arbeiðið hjá hvørjum einstøkum arbeiðstakara, og er hon fylgiskjal til ta yvirskipaðu tilbúgvingarætlanina og HTU-ætlanina.

Har skulu tilskilast upplýsingar fyri ábyrgdarpersónar og telefonnummur í sambandi við óhapp.

Tilbúgvingarætlanin skal lýsa bjargingarátøk í sambandi við ”serliga vandamikið arbeiði”, sum er lýst xxxxxx, og við vandamikil evnir og tilfar, sum arbeiðstakarin brúkar. Serstøk vegleiðing skal gerast.

Arbeiðstakarin hevur ábyrgd av at gera ætlanina og dagføring av ætlanini.

# Ávaring og tilbúgving - mannagongd

## Steðga vanlukkuni

Steðga vanlukkuni. Fá yvirlit og tryggja kringumstøðurnar. Ger tað tú kanst , fyri at skaðin ikki gerst størri.

Kanna óhappið og met um skaddi skal á sjúkrahús ella skaðastovu

## Hjálp skadda

Met um støðuna hjá skadda og hvør hjálp  er neyðug. Gev ta hjálpina tú kanst. Um støðan er bráfeingis, gev 1. hjálp.

## Tilkalla hjálp - ring 1-1-2

Sig, hvør tú ert,

hvar tú ert: Bústaður, bygd/býur,

hvat telefonnr. ringt verður frá,

hvat er hent: Eldur, vanlukka, dálking,

hvussu nógv eru skadd ella eru í vanda

## Send ein starvsfelaga at taka ímóti bjargingarfólki at vísa til vanlukkustaðið

## Vanlig 1. hjálp. Markera vanlukku øki.

Markera ella avbyrg vanlukkuøki.

Um til ber, halt á fram við bjargingar- , sløkkiarbeiðinum.

## Fráboða byggileiðaranum

Set teg í samband við trygdarsamskiparan og kunnað um óhappið/vanlukkuna

Navn: <Navn>
Fartlelefon: <tlf nr.>

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

| Hending | Serlig eyðkenni | Hvat gert tú? | Hvør skal hava boð | Telefon nr. | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|
| Alment – skal fylgjast í samband við allar hendingar | | Formaður/nærmasti leiðari/arbeiðsleiðaraumboð /trygdarumboð verður kontaktaður í samband við niðanfyristandandi hendingar<br>Starvsfelagið um hevur 1. hjálparprógv | Nærmasti leiðari: <Navn><br><br>Navn: <Navn> | Xxxxxx<br><br>Xxxxxx | |
| | | Formaður/nærmasti leiðari fylgir upp uppá hendingina og setur seg í samband við trygdar-/HTU – samskiparan | Trygdarsamskipari er : <Navn> | xxxxxx | |
| Persónsóhapp | | • Steðgað óhappinum (yvirlit, tryggja)<br>• Gev lívbjargandi fyrstuhjálp<br>• Boða frá óhappinum<br>• Gev vanliga fyrstuhjálp<br>• Tryggja, at ein tekur ímóti sjúkrabilinum - avtala møtistað og vís veg.<br>• Halt á fram við vanligari fyrstuhjálp<br><br>Ver klár/ur at hjálpa við flutningi av skaddum persóni. | Alarm 1-1-2 (bíðitíð 15 sek.)<br><br>SIG ALTÍÐ:<br>• Hvar er óhappið hent – adressa og kommuna<br>• Hvør tú ert<br>• Hvar tú ringir frá – upplýs telefon nummar.<br>• Hvat er hent<br>• Hvør er skaddur<br>Kontakta nærmasta leiðara: Sí omanfyri | Alarm 1-1-2 (bíðitíð 15 sek.) | Tá biðið verður um sjúkrabil kemur Løgreglan eisini á staðið. Arbeiðseftirlitið verður tilkallað av løgregluni.<br><br>Legg tær í geyma, hvar fyrstuhjálparútgerðin er.<br><br>Umráðandi, at nærmasti leiðari tryggjar sær kunnleika til persónligar sjúkur, so sum sukursjúku og epilepsi, so lokal atlit kunnu takast fyri hesum.<br><br>Kannað orsøk/ir til persónsóhappi og set fyribyrjandi tiltøk í gongd. |
| Álvarslig nærvið hending | | Steðga hendingini.<br>Avbyrg økið, um vandi er fyri fleiri hendingum.<br>Ansa eftir at starvsfelagaðar/sjónarvitnir ikki fara í sjokk – tosað við tey um hendingina | Set teg í samband við tín nærmasta leiðara og trygdarumboð. | | Kannað orsøk/ir til nærvið hendingina og set fyribyrjandi tiltøk í gongd. |
| Eldur | | | Alarm 1-1-2 (bíðitíð 15 sek.)<br><br>SIG ALTÍÐ:<br>• At tað er eldur í<br>• Hvør tú ert<br>• Hvar tú ert <Bústaður><br>• Hvørjum telefonnummari, tú ringir frá<br>• Hvat er hent<br>• Hvussu nógvir persónar, ið eru komnir til skaða ella eru í vanda.<br><br>Kontakta nærmasta leiðara, sí omanfyri | Alarm 1-1-2 (bíðitíð 15 sek.) | |
| Óhapp við dálking | | Fá tær yvirlit yvir støðuna<br>• Steðgað óhappinum – royn at forða dálkingini í at sleppa út í náttúruna.<br>• Boða frá óhappinum<br><br>Ger hvat tú kanst fyri at rudda upp | • Boða nærmasta leiðara frá, sí omanfyri<br>• Boða løgregluni og Umhvørvistovuni frá um dálking fer út av økið,<br>• Kloakktrupulleiki – Brennistøðin/kommunan | 351448<br>342400<br><br>xxxxxx | |
| Brot á háspenningskaðal<br><br>Spenningur 10.000V-60.000V | Liggur minimum 0,70 m niðurgrivin.<br>-Liturin á kaðalinum er svartur.<br>-Liturin á dekkbandinum er reyður.<br>-Liturin á rørinum um kaðalarnar er reyður. | Steðga arbeiðinum.<br>Halt avstand og syrg fyri at ikki nakar kemur í samband við brotið á leiðingini - tað kann verða spenningur á leiðingini.<br>Sløkk streymin um møguligt. | SEV<br><br>Evt. Løgreglan/Sløkkilið | 346800<br><br>351448 | |

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Brot á lágspenningskaðal<br><br>Spenningur 50V-1000V | Liggur minimum 0,35 – 0,80 m niðurgrivin.<br>-Liturin á dekkbandinum er reyður.<br>-Liturin á kaðalinum er grátt ella svart. | Steðga arbeiðinum.<br>Halt avstand og syrg fyri at ikki nakar kemur í samband við brotið á leiðingini - tað kann verða spenningur á leiðingini.<br>Sløkk streymin um møguligt. | SEV<br>xxxxxxx<br><br>Brandmeistari | 346800<br>xxxxxx<br><br>xxxxxxx | |
| Brot á kloakkleiðing | | Steðga arbeiðinum Syrg fyri at kloakkvatn ikki kemur á teg ella onnur. Set teg í samband við kommununa. | Kommunan | xxxxxxx | |
| Brot á vatnleiðing | Leiðingin er blá | Set teg í samband við vatnmeistaran. Er ikki vandamikið | Vatnmeistarin | xxxxxxx | |
| Brot á telefonkaðal | Kaðal er Orange ella Svartur, møguliga í gulari dragislangu | Eru ikki streymførandi. Eru ikki vandamiklir. Set teg í samband við Føroya Tele | Føroya Tele | 303030 | |
| Brot á leiðing, sum er ókend | | Steðga arbeiðinum. Set teg í samband við leiðaran/trygdar-/ HTU –samskiparan | Trygdarsamskipari <navn> | xxxxxx | |

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo